LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Frágreiðing løgmans á ólavsøku 2026

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Ólavsøkurøða løgmans 2026

Harra formaður.

*Ein glotti fyri framman,*
*ytst í havsbrúnni hómast ljós.*
*Nú standið saman fólkið*
*og setið út í kort nýggja kós.*

Vónríku orðini hjá M. C. Restorff hóska seg væl, nú farið verður inn í fyrsta tingárið eftir valið.

Nýtt løgting.

Nýtt landsstýri.

Nýggj kós er sett út í kortið.

Kósin, vit hava sett, skal fyrst og fremst styrkja samanhaldið millum ættarliðini í Føroyum.

Samantvinna ung og eldri.

Styrkja røturnar, sum halda okkum saman og geva nýggjum spírum bestu umstøður at vaksa.

Endamálið er at finna varandi semjur, sum vit eru felags um.

Ikki bara nú, men í mong ár frameftir.

***

Harra formaður.

Fyrr í ár sótu nærum allir føroyingar sum undir andakt og hugdu at sendirøðini Hoydalar.

Ungir spírar valdu sangir, sum hava livað í okkara felags minni og góvu teimum nýtt lív.

Teir fingu nýggjar greinar at vaksa úr rótum, sum undanfarin ættarlið hava fest.

Júst henda myndin sigur nógv um samfelagið, vit vilja skapa.

Vit skulu ikki velja millum tað gamla og tað nýggja.

Vit skulu ikki seta ættarlið hvørt upp ímóti øðrum.

*Ferðast í flokkum, men spjødd innaní,* yrkir Eyðun Nolsøe.

Tá ið vit eru spjadd, dragnar samfelagið.

Tað mennist, tá ið allir føroyingar hava møguleikar at festa røtur, vaksa og seta sín egna dám á framtíðina.

***

Og júst tað at festa røtur byrjar við einum staði at hoyra til.

Einum heimi.

Einum bústaði.

Í dag kenna ov nógv fólk, at leiðin til egnan bústað er ov long og tung.

Tað ávirkar ikki bara tey ungu.

Tað ávirkar alt samfelagið.

Tí tá ið fólk ikki fáa sett búgv, verður eisini torførari at stovna familju og skapa eina framtíð her í Føroyum.

Vit skulu ikki hava sitandi á okkum, at ættarliðini, sum koma, eru verri fyri enn foreldur teirra.

Vit fara tí at seta ítøkilig átøk í verk á bústaðarmarknaðinum.

Mvg verður afturborið, tá ið nýggir bústaðir verða bygdir.

Tað verður einfaldari at avgreiða byggimál, tí viðgerðin av málum um matrikkulering verður stytt.

Byggisamtyktir verða frameftir bara góðkendar av kommunum.

Bygningskunngerðin verður endurskoðað.

Vit fyrireika ein bústaðagrunn, ið skal lætta um fíggingina hjá teimum, sum keypa ella byggja sín fyrsta bústað.

Og í løtuni verða fyrstu stigini tikin til at byggja nýtt lestrarheim við hundraðtals íbúðum, eins og vit kenna tað í okkara grannalondum.

***

Harra formaður.

Í sanginum Morgun hjá Martini Joensen, sum spírin Emma tulkaði so inniliga í Hoydølum, verður sungið:

*Ábyrgdin á tínum herðum,*
*gáva frá okkum til tín.*
*Byrða, ið tung er at bera –*
*ber hana betur enn vit.*

Skulu komandi ættarlið bera byrðar betur enn undanfarin, skulu vit áhaldandi gera umstøðurnar hjá familjum lættari.

Foreldur skulu sjálv kunna leggja barsilsfarloyvið til rættis eftir sínum tørvi. Tí tað eru fyrst og fremst tey, sum kenna tørvin hjá familjuni.

Tí hevur samgongan sett sær fyri at gera barsilsskipanina smidligari.

Høgur livikostnaður rakar nógv, og serliga barnafamiljur merkja tað, tá ið útreiðslurnar vaksa.

Tí verður skattafríur barnakekkur á 20.000 krónur latin, tá ið ein fær barn.

Barnafrádrátturin skal hækka í stigum næstu árini.

Og farið verður undir at hækka mánaðarliga hámarkið fyri barsilspening.

Hesi eru átøk, sum skulu gera tað lættari at skapa eitt familjulív í Føroyum.

Men góður familjupolitikkur snýr seg eisini um tey ungu og teirra møguleikar.

Ætlanin er at seta á stovn skattafría íløgukontu, sum kann eggja fólki til íløgur og geva betri møguleikar at spara saman.

Málið er eisini at hækka bæði frádráttin hjá lesandi og inntøkumarkið fyri mótrokning í lestrarstuðli.

Endamálið er at minka um fíggjarliga trýstið á tey lesandi og gera tað lættari at útbúgva seg í Føroyum.

***

Men harra formaður.

Í Hoydølum vóru tað ikki bara tey ungu, sum vóru í miðdeplinum.

Hvør sangur hevði sína søgu.

Og framman fyri hvønn spíra stóð ein stjørna, sum hevði gingið leiðina frammanundan.

Eitt undangongufólk.

Soleiðis er eisini í Føroyum.

Gerandisdagurin í dag er skaptur av ættarliðum, sum løgdu lív og sál í, at nógv av okkum skuldu fáa møguleikarnar at trívast og mennast.

Og tíbetur hava vit millum virknastu eldru borgarar í Evropa.

Helvtin av borgarum millum 65 og 74 ár er í arbeiði.

Tað er eingin sjálvfylgja.

Tað er tí, at arbeiðssemi eyðkennir okkara mentan.

Og júst hetta er púra avgerandi fyri samanhangsmegina millum ættarliðini.

Tí Føroyar eru fámentar.

Tað merkir, at hvør einasta arbeiðandi hond, sama hvør aldurin er, flytur okkum rætta leið og slóðar fyri, at vit varðveita tað góða samfelagið.

Og tí, harra formaður, skulu vit hava eina skipan, har tað loysir seg betur at arbeiða. Eisini hjá pensjonistum.

Tí verður markið fyri mótrokning hækkað.

Og vit mugu tryggja, at tey, sum av ymsum orsøkum mugu av arbeiðsmarknaðinum, hava virðilig kor.

Fyritíðarpensjonistar hava ikki somu eftirlønarskipan sum aðrir pensjonistar og verða verri fyri fíggjarliga, tá ið teir verða fluttir yvir í fólkapensjón.

Tí fáa teir eina serliga eftirlønarviðbót aftrat vanligu fólkapensjónini.

***

Harra formaður.

Eitt gott samfelag verður ikki einans mátað eftir tí, sum tað gevur okkara ungu.

Tað verður eisini mátað eftir, hvussu væl vit fara við okkara eldru borgarum, sum hava gjørt sínar skyldur og tikið ábyrgd ígjøgnum eitt heilt arbeiðslív.

Sagt á annan hátt:

Vit skulu virðismeta sporini, sum okkara forfedrar settu í sandin.

Vit mugu ongantíð gloyma røturnar, sum góvu okkum lív.

***

Men harra formaður.

Ikki alt, sum festir røtur, er gott. Tað mugu vit hava í huga.

Í Skriftini lesa vit, at okkurt kann vera rót til alt ilt.

Í dag haldi eg, at vit øll á hesum høga tingi kunnu vera samd um, at rúsevni eru rótin til alt ilt.

Og tí mugu vit leggja meira fyri nú.

Fyrr í summar boðaði løgreglan frá, at brotsverkini í Føroyum gerast álvarsamari.

Hald verður lagt á størri nøgdir av rúsevnum, og tað kann vera ein ábending um vaksandi misnýtslu.

Hetta eru hagtøl.

Men tað eru menniskju, ið búgva undir hagtølunum.

Ung fólk við dreymum.

Foreldur við stúranum.

Vit skulu ikki hyggja burtur.

Vit skulu taka ábyrgd.

Øll í felag.

Tí hetta er ikki bara eitt samgongumál, men eitt samfelagsmál.

***

Hvat er rótin til alt hetta ónda, sum floymir inn í føroyska samfelagið?

Ábendingar eru um, at tað eru bakfólk í útlendskum harkaliðum. Tey rinda ofta heilt ungum fólkum og viðbreknum borgarum í Føroyum smáar upphæddir fyri ólógligar tænastur.

Tað skal steðgast.

Og tí er spurningurin, um tíðin er komin, at politiski myndugleikin – í samráð við løgregluna – setur í verk serstøk átøk móti skipaðum brotsverkum og harkaliðum.

Hetta skal forða fyri, at okkara børn og ungu gerast partur av slíkum oyðileggjandi virksemi.

Samstundis mugu vit ásanna, at hetta er ein samansettur trupulleiki.

Eitt fet á leiðini er at herða revsingar og styrkja eftirlitið við markið.

Men tað týdningarmesta er at fyribyrgja og tálma rúsevnanýtslu sum heild.

Og her hugsi eg ikki bara um misnýtslu, men eisini nýtslu.

Í seinastuni hava vit sæð fleiri dømi um, at tað er vorðið vanligt at taka rúsevni á almennum, sjónligum støðum, eitt nú á festivalum.

Sum løgmaður verður tað ein av mínum fremstu uppgávum at seta neyðug átøk í verk ímóti tí.

Tí avleiðingarnar eru vanlukkuligar.

Fyri hvønn einstakling, sum kemur ígjøgnum lívið uttan misnýtslu, spara vit familjur fyri stúran, stovnar fyri stórar uppgávur og samfelagið fyri høgan kostnað.

Tí verður SSP-samstarvið styrkt.

Seinni í ár letur RÓWT nýtt tilhaldsstað upp til ung við samansettum trupulleikum. Endamálið er, at ung fáa tak yvir høvdið og kenna seg vird og hoyrd.

Nýtt og dagført undirvísingartilfar um rúsevni verður gjørt.

Arbeitt verður við at styrkja fyribyrging, skjóta hjálp og viðgerð til fólk við misnýtslu og teirra familjur.

***

Men tíbetur, harra formaður, eiga vit eisini livandi fyrimyndir at spegla okkum í.

Her hugsi eg bæði um ítróttarfelagsskapir, sjálvboðin, eldsálir og einstaklingar.

Í dag vil eg draga fram søguna hjá Rúnu Nón Bjartalíð.

Rúna greiddi fyrr í ár alment frá, hvussu hon slapp burtur úr rúsevnismisnýtslu.

Sum 18 ára gomul tók hon trupla stigið og bað Martin Kúrberg hjálpa sær.

Tá ið hon ringdi til Martin, svaraði hann:

"Tær havi eg bíðað leingi eftir."

Orðini vóru byrjanin til, at hon fótaði sær.

Í dag er hon ein virkin og týðandi partur av felagsskapinum í KÍ.

Og besta fyribyrgingin er júst, at børn og ung hava ein góðan felagsskap at vera partur av.

Tí gleða vit okkum til Oyggjaleikirnar, sum verða í Føroyum næsta ár. Tað er eitt sjálvsagt høvi at savna allar Føroyar um góðar fyrimyndir, sterkar felagsskapir og virkið ungdómslív.

***

Harra formaður.

*Úr útheimi koma árin, sum broyta lívsvirðini nógv,* verður sungið í Føroyingar eftir M. C. Restorff, sum spírin Sophilia tulkaði egið og vakurt í Hoydølum.

Tey orðini minna okkum á, at Føroyar liva ikki avbyrgdar frá umheiminum.

Trygdarstøðan í Evropa og um okkara leiðir er vorðin munandi meira avbjóðandi, og tað setur stór krøv til samanhald og samstarv.

Tí er avgerandi, at Føroyar enn sum áður standa saman við okkara sameindu í NATO og vesturheiminum.

Men árin úr útheimi síggjast eisini á annan hátt.

Í dag gongur væl búskaparliga, og so at siga eingin er arbeiðsleysur.

Tí eru nógv útlendsk arbeiðsfólk komin til Føroya. Tey eru við til at halda hjólunum í gongd í vinnuni.

Fleiri teirra hava gjørt Føroyar til sítt heim, duga føroyskt og eru ein virkin partur av okkara samfelagi. Tað er ein styrki.

Men eitt lítið samfelag sum okkara hevur eisini skyldu at hugsa um, hvussu tilflytingin verður skipað.

Vit kenna gongdina frá fleiri grannalondum, har ov skjót og illa skipað tilflyting hevur elvt til stórar avbjóðingar.

Avleiðingin er, at vælferðarskipanir kunnu hokna undir trýstinum.

Teimum royndunum skulu vit læra av.

Annars fáa vit somu trupulleikar og kunnu gerast fremmand í egnum landi.

Tí er farið undir eina umfatandi broyting í útlendingalógini.

Ein lóg um onnur trúarsamfeløg verður fyrireikað, sum staðfestir, at føroysk lóggáva og mentan, fólkaræði, javnstøða og virði skulu virðast.

Men vit mugu eisini gera broytingar alt fyri eitt.

Tí verða reglurnar um familjusameining broyttar sum skjótast, so tað ganga í minsta lagi trý ár, áðrenn samfylgjandi familja kann flyta til Føroya.

Harumframt verður krav sett um reina revsiváttan.

Vit hava stóran tørv á arbeiðsmegi og mugu hava góðar skipanir til frama fyri hetta.

Men vit skulu fremst av øllum tryggja, at føroyska samfelagið framvegis byggir á tey virði, sum hava bundið ættarlið saman og gjørt oyggjarnar til tað, tær eru í dag.

***

Harra formaður.

Í Hoydølum hoyrdu vit ungar spírar finna sína egnu rødd.

Eingin teirra royndi at vera ein annar. Tey bygdu á tað, sum onnur høvdu skapt, og høvdu sína egnu tulking.

Soleiðis eigur útbúgvingarskipanin eisini at vera.

Vit hava ikki brúk fyri, at øll velja somu leið. Vit hava brúk fyri, at tey ungu finna sína egnu leið.

Seinastu árini eru yrkisútbúgvingarnar komnar í ljósmála, og í Føroyum hava vit ein sunnan hugburð, sum virðismetir handaligu útbúgvingarnar.

Yrkisnám er vorðið ein sólskinssøga.

Leiðirnar hjá føroyskum ungdómi eru ymiskar.

Men tær hava allar eitt í felag.

Tær byggja á dirvi, arbeiðssemi og viljan at læra.

Fyrr í ár lósu vit á fiskur.fo um unga havnarmannin Andreas, sum greiddi frá, at dreymurin er at føra trolara.

Í norskum miðlum hevur Hildebrand víst, at ein ungur føroyingur kann vinna sær virðismiklar royndir á sjónum, samstundis sum hann megnar at standa á egnum fíggjarligum fótum.

Og í lýsing fyri Setrið sóu vit ein av spírunum úr Hoydølum, Onnu Lovisu, mæla øðrum til at gera tað sama sum hon, nevniliga lesa búskapar- og virkisfrøði í Føroyum.

Møguleikarnir eru nógvir og fjølbroyttir.

Vit skulu hava eitt samfelag, har eingin ungur kennir, at teirra val er minni vert enn valið hjá øðrum.

Tí fer samgongan at styrkja samstarvið millum arbeiðsgevarar, fakfeløg og myndugleikar. Fyrst á skrá er at endurskoða yrkisútbúgvingar.

Kampusverkætlanin heldur fram, og væntandi verður farið undir at byggja felagsbygningin um ársskiftið. Á leið trý ár eftir tað er ætlanin, at lesandi á Setrinum flyta inn í bygningin.

Atgongdin til vaksnamannalæru og førleikamenning skal gerast betri, og eisini ung við serligum tørvi skulu fáa møguleika at taka eina yrkisrættaða útbúgving.

Ætlanin er at seta útbúgvingina til klædnahandverkara á stovn í Føroyum.

Vit vilja hava ein meira skapandi fólkaskúla, har tað kreativa, handaliga og verkliga fær størri rúmd.

Tí øll børn og ung læra ikki á sama hátt.

Samstundis mugu vit laga skúlan til ein nýggjan og tøkniliga avbjóðandi veruleika.

Tí verða stig tikin til at banna ella avmarka snildtelefonir í fólkaskúlanum og seta aldursmark fyri sosialar miðlar.

Og vit dagføra námsætlanir og próvtøkuhættir, við tí í huga, at vitlíki er partur av gerandisdegnum.

Tøknin broytist skjótt.

Men endamálið við skúlanum broytist ikki.

Hann skal framvegis menna menniskju, sum duga at hugsa sjálvstøðugt, taka ábyrgd og brúka síni evni til gagns fyri samfelagið.

***

Harra formaður.

Skulu okkara fólk brúka síni evni til fulnar, mugu vit tryggja, at samfelagið er sterkt og haldført.

Eitt sterkt samfelag krevur sterkt vinnulív.

Sjógvurin er framhaldandi grundarlagið undir føroysku vinnuni, men nýggir spírar vaksa eisini fram.

Smærri fyritøkur og íverksetarar menna nýggj hugskot, loysnir og møguleikar.

Vit vilja, at tað skal vera lætt at stovna virki, at krøvini til umsiting skulu vera so fá og einføld sum gjørligt, og at arbeitt verður við at styrkja fíggingarmøguleikar.

Høgi oljuprísurin og stóri orkutørvurin gera, at oljuleitingin um okkara leiðir er farin at taka seg upp aftur. Ferð verður tí sett á arbeiðið at eggja útlendskum oljufeløgum at koma til Føroya at leita eftir olju.

Vinnan hevur altíð dugað at laga seg eftir umstøðunum.

Hon hevur ment seg, tá ið nýggir møguleikar vísa seg, og hon hevur funnið nýggjar leiðir, tá ið tíðirnar eru broyttar.

Somu ábyrgd hevur politiska skipanin.

Skulu vit koma á mál við átøkunum, samgongan ætlar at fremja, mugu vit tora at gera nýskipanir.

Men nýskipanir eru ikki eitt mál í sjálvum sær.

Tær skulu vera skynsamar og ábyrgdarfullar.

Einki at gera kann eisini merkja at gera okkurt skeivt.

Politikkur snýr seg um at taka ábyrgd av avgerðunum, sum fáa týdning mong ár fram í tíðina.

Tað er okkara uppgáva sum politisk skipan at tryggja, at vit ikki lata avbjóðingarnar vaksa seg størri, enn tær nýtast at vera.

Tá ið eg nevni politisku skipanina, hugsi eg fyrst og fremst um løgting og landsstýri.

Men eg vil eisini koma við eini áheitan á bý- og bygdarráðini kring landið.

Fleiri tykkara hava tosað um sjálvbodnar samanleggingar.

Tit hava møguleikan at finna loysnirnar sjálv, og tað er best fyri allar partar.

***

Harra formaður.

Nýskipanir snúgva seg eisini um at gera alt einfaldari.

Lat meg nevna tvey dømi:

Tá ið borgari hevur tørv á fysioterapi, skal óneyðug málsviðgerð ikki seinka hjálpini. Tí verður arbeitt við eini skipan, har borgarar fáa beinleiðis og skjótari atgongd til fysioterapi.

Tá ið borgari hevur tørv á kommunulækna, skulu talgildir møguleikar nýtast betur. Tí skal møguleiki vera fyri talgildari sjónbandaviðtalu, tá ið tað gevur meining.

Eisini skulu vit endurskoða lógarverkið, so øll óneyðug fyrisiting verður tikin burtur.

Aðalmálið er, at borgarar skulu fáa skjótari og greiðari svar, og almennar tænastur skulu skipast soleiðis, at tær tæna fólkinum.

***

Samstundis er neyðugt støðugt at brynja Føroyar til avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman.

Samgongan ætlar at føra ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk og gera íløgur í framtíðina.

Tí skulu vit hava eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum styrkir almennu fíggjarstýringina.

Tí verður farið undir at hækka partafelagsskattin hjá fíggjarfyritøkum úr 18 prosentum upp í 22 prosent.

Og tí verður arbeitt við einari langtíðarløguætlan fyri komandi tíggju árini, har ásett verður, hvørjar íløgur eru neyðugar.

Málið er, at hetta verður gjørt í so breiðari politiskari semju sum møguligt.

***

Ein av stóru avbjóðingunum, harra formaður, er broytingin í fólkasamansetingini.

Vit gerast fleiri eldri, og tað fer at seta størri krøv til vælferðarskipanir.

Tí fara vit – saman við kommununum – at taka støðu til, hvussu eldraøkið skal fíggjast frameftir.

Endamálið er at tryggja góðar tænastur til eldri borgarar uttan at leggja óneyðugar byrðar á komandi ættarlið.

Stórar avgerðir eru sjáldan tær lættastu.

Men tær eru neyðugar, vilja vit lata eftirkomarunum eitt sterkt samfelag.

***

Harra formaður.

Í Hoydølum sóu vit, at nýtt kann vaksa fram, uttan at tað gamla hvørvur.

Tað er kanska júst tað, sum er okkara størsta uppgáva sum samfelag.

Hvørt ættarlið fær samfelagið til láns eina løtu.

Hvørt ættarlið má seta sína kós.

Tað, vit gera í dag, verður grundarlagið undir teimum avgerðum, sum komandi ættarlið skulu taka.

Tí skulu vit bæði varðveita tað, sum hevur tænt Føroyum væl, og hava dirvi at broyta tað, sum eigur at broytast.

Vit skulu geva ungum møguleika at seta búgv, stovna familju og finna sína egnu leið.

Vit skulu virðismeta tey, sum hava gingið undan og bygt samfelagið.

Og vit skulu taka avgerðirnar í dag, sum gera Føroyar sterkari í morgin.

Tað er hesi kósini, samgongan fer eftir, og tað er mín vón, at alt løgtingið er við.

Eini kós, sum byggir á ábyrgd, samanhald og álit á, at Føroyar eru uppaftur sterkari, tá ið næsta ættarlið tekur við.

Góða ólavsøku.

Gud signi Føroyar.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Ískoytispartur til ólavsøkufrágreiðing løgmans 2026

# LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Átøk at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu**
Greið tekin eru um, at hørð rúsevni seinastu árini eru vorðin ein vaksandi trupulleiki í Føroyum. Vit síggja, at ymisk rúsevni nú koma til landið, sum áður vóru ókend um okkara leiðir. Rúsevni eru sera oyðileggjandi fyri okkara ungdóm, familjur teirra og samfelagið sum heild.

Landsstýrið hevur tí sett sær fyri at seta munadygg átøk í verk fyri at fyribyrgja, at rúsevnismisnýtsla fær fastatøkur á okkara samfelag. Løgmaður hevur gjørt av at átaka sær ábyrgdina av at samskipa hetta arbeiðið.

Neyðugt er at arbeiða á fleiri mótum, millum annað við at styrkja eftirlitið við innflutningi og teimum ferðandi, við at arbeiða breitt fyribyrgjandi og við at veita skjóta og dygdargóða fyribyrging og hjálp til misnýtarar og familjur teirra.

Støði verður millum annað tikið í tilmælunum í Heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu frá 2022.  Løgmaður avger saman við viðkomandi landsstýrisfólkum, hvørji átøk í fyrstu syftu eiga at raðfestast, og nágreinilig tíðarætlan verður gjørd fyri, nær hvørt átak eigur at setast í verk.

**Herd revsing fyri álvarsom brotsverk**
Rúsevni eru ein stór hóttan mótvegis okkara børnum og ungdómi og kunnu oyðileggja okkara samfelag, um vit ikki taka trupulleikan í álvara. Tí er ætlanin at herða revsingina fyri rúsevnis-brotsverk, so tey, sum innflyta og selja rúsevni, merkja, at slíkt als ikki verður góðtikið í Føroyum.

Eisini er ætlanin at kanna, um revsilóggávan er nøktandi og tíðarhóskandi í mun til kynslig brotsverk, eitt nú viðvíkjandi vitlíkistilfari o.ø.

**Einfaldari lóggáva**
Samgongan hevur sett sær sum mál at endurskoða lógarverkið fyri at minka um óneyðuga fyrisiting og eftirlit. Óneyðug lóggáva skal avtakast, og tí skulu øll landsstýrisfólkini meta um, hvør óneyðug lóggáva kann avtakast á teirra øki. Eisini skulu tey meta um, hvussu viðgerðartíðir kunnu styttast t.d. við at avtaka óneyðug lið í kæruviðgerð. Frágreiðing um hetta verður klár við ársenda.

**Viðurskiftini við Danmark**
Samstarvið og samskiftið við danskar myndugleikar er gott, ikki minst á verju- og trygdarpolitiska økinum, har føroyskir myndugleikar fáa regluliga kunning um viðkomandi mál. Hóast samstarvið er gott, eru allir flokkar í Føroyum samdir um at Føroyum tørvar størri uttanríkispolitiskar

heimildir. Landsstýrið hevur sett sær sum mál í samgonguskjalinum at virka fyri, at Føroyar fáa størri uttanríkispolitiskar heimildir. Serliga verður hugsað um limaskap í Norðurlandaráðnum, altjóða fiskiveiðifelagsskapum sum NEAFC og NAFO umframt olympisku nevndini IOC.

**Limaskapur í altjóða olympisku nevndini IOC**

Landsstýrið hevur sett sær fyri at arbeiða fyri, at Føroyar fáa limaskap í altjóða olympisku nevndini IOC. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við ÍSF, sum hevur sett samskipara til at taka sær av málinum. Somuleiðis verður samstarvað við donsku stjórnina, sum í sínum samgonguskjali hevur sagt seg vilja virka fyri føroyskum limaskapi í IOC.

**Føroyskt heiðurstekin**

Við støði í løgtingssamtyktini frá 2022 (LM-120/2021) um at fyrireika eina skipan við føroyskum heiðurstekni varð í november 2023 sett ein serstøk nevnd at gera tilmæli í málinum. Nevndin handaði 25. apríl 2026 løgmanni “Álit um føroyskt heiðurstekin”. Løgmaður fer at taka málið upp við allar flokkar í Løgtinginum við tí endamáli at tryggja breiða politiska undirtøku undir eini skipan við føroyskum heiðurstekni.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Stutt um búskapin**

Búskaparstøðan í Føroyum er sum heild góð. Vøkstur er í búskapinum, nettotilflyting er til landið, talið á starvsfólkum er methøgt, og einki arbeiðsloysi er í landinum. Størsta avbjóðingin í búskapinum er haldførið í almenna búskapinum.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at BTÚ hækkar millum 4% og 5% í 2026 og í 2027 (í ársins prísum). Avgerandi fyri vøksturin í 2026 og 2027 verður gongdin í altjóða búskapinum, og serliga hvussu leingi ófriðurin í Miðeystri, og harvið órógvið á altjóða orkumarknaðinum, heldur fram, og um ófriðurin annaðhvørt hæsar av ella breiðir seg til onnur øki og lond. Afturat hesum verða prísvøksturin, gongdin í rentustøðinum og gongdin á altjóða fíggjarmarknaðunum avgerandi fyri gongdina.

*Fíggjarpolitisk mál 2026–2029*

Neyðugt er støðugt at brynja Føroyar til avbjóðingarnar, ið liggja fyri framman. Samgongan ætlar at fremja nýskipanir, føra ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk og gera íløgur í framtíðina.

Vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá landinum skal fylgja einum avtalaðum leisti í einum fíggjarpolitiskum regluverki fyri at fáa langtíðar javnvág í fíggjarlógina. Íløgurnar verða gjørdar eftir langtíðarløguætlan og skulu vera umleið 8% av útreiðslunum í fíggjarlógini.

**Fíggjarpolitiskt regluverk**
Eitt fíggjarpolitiskt regluverk snýr seg um at dagføra og styrkja almennu fíggjarstýringina. Endamálið er serliga at seta greiðari mørk fyri, hvussu nógv raksturin kann vaksa, og at tryggja meira haldføra fíggjarliga gongd.

**Avskrivingar**
Ætlanin er at fara til eina skipan við avskriving av løgum hjá landinum. Tað fer at geva meira rættvísandi mynd av almenna búskapinum og skynsamari fíggjarstýring. Fíggjarmálaráðið arbeiðir saman við Gjaldstovuni við at fyrireika málið.

**Ríkisveitingin óbroytt**
Ríkisveitingin verður óbroytt á 541,8 mió. kr. frá 2027. Ríkisveitingin fer sostatt at minka sum partur av samlaðu inntøkunum hjá landskassanum. Ríkisveitingin verður í 2029 mett til 6,5% av inntøkunum hjá landskassanum í mun til 7,6% í 2025.

**Langtíðarløguætlan**
Málið er at gera eina løguætlan fyri landið fyri komandi 10 árini. Endamálið er, at almennu løgurnar verða raðfestar og stýrdar. Fíggjarmálaráðið leiðir arbeiðið saman við øðrum viðkomandi stovnum.

**Keyp landsins**
Partur av skynsamari fíggjarstýring er at bjóða út keyp av vørum og tænastum á keypsportalinum fyri at fáa meira burtur úr skattakrónunum og at stimbra kappingina á privata vøru- og tænastumarknaðinum.

Ongantíð áður hava almennir stovnar og ráð bjóðað so nógvar uppgávur og tænastur út sum í fjør. 71 útboð vórðu stovnað á Keypsportalinum, sum er ein vøkstur á 61% frá árinum fyri. Samstundis vórðu níggju nýggir rammusáttmálar gjørdir, sum hava givið munandi sparingar fyri almennar stovnar. Metta árliga sparingin av hesum er nærum tríggjar milliónir krónur, og samlaða sparingin frá rammusáttmálum síðani 2020 er oman fyri 6,5 mió. kr.

Í 2026 verður hildið fram á somu kós við at menna skipanir, styrkja ráðgevingina og fáa fleiri stovnar og kommunur at brúka pallin. Alt við tí í huga at fáa størri gjøgnumskygni í almennum keypi og fáa sum mest fyri hvørja krónu.

*Skatta- og avgjaldsbroytingar*

**Fyribilstiltøk at lætta um avleiðingarnar av hægri oljuprísum**
Fyribils og tíðaravmarkað frítøka fyri mvg á bensin og diesel er sett í verk frá mai til og við juli. Kostnaðurin er mettur til 20 mió. kr.

**Barnafrádrátturin skal hækkast stigvíst næstu árini**
Barnafrádrátturin verður stigvíst hækkaður. Talan er um skattligan frádrátt, sum landið varðar av og TAKS umsitur.

**Skattaskipanin skal javnast**
Skattaskipanin skal javnast soleiðis, at skattastigin fylgir inntøkunum í samfelagnum. Tað verður framt við serstakari lóg og neyðugum fylgibroytingum í øðrum skattalógum. Endamálið er at forða fyri, at borgarar og vinnulív fara at rinda lutfalsliga meira í skatti yvir tíð uttan politiska avgerð. Fíggjarmálaráðið samstarvar við TAKS og kommunurnar um at lýsa málið.

**Skattafrí íløgukonta**
Ætlanin er at seta á stovn eina skattafría íløgukontu í Føroyum. Tað verður framt við lógarbroyting ella við serstakari lóg og í samstarvi við TAKS, peningastovnar og aðrar viðkomandi partar. Endamálið er, at vit fáa eina skipan, sum kann eggja fólki til íløgur, og geva teimum betri møguleikar at spara upp.

**Uttanlands- og NAV-frádráttur**
Ætlanin er at broyta reglurnar fyri uttanlandsfrádrátt, samdøgursfrádrátt og frádrátt fyri sosial gjøld hjá teimum, sum arbeiða uttanlands. Tað verður gjørt við lógarbroytingum í skattalógini.

**Frádrátturin hjá lesandi skal hækkast**
Málið hjá samgonguni er at hækka frádráttin hjá lesandi. Tað verður gjørt við serligum inntøkufrádrátti. Endamálið er at betra um korini hjá lesandi og at minka um fráflyting.

**Inntøkufrádráttur fyri limaskap í fakfelagi**
Limir í fakfeløgum skulu fáa frádrátt upp til 4.000 krónur um árið fyri limagjald í fakfeløgum. Tað verður eftir ætlan sett í verk stigvíst frá 2027.

**Mvg-stuðul til nýbygging av bústøðum**
Sett verður í verk ein tíðaravmarkað skipan við afturbering av mvg fyri nýbygging av bústøðum í staðin fyri rentustuðul og við ásettum mørkum fyri støðd og upphædd. Endamálið er at stimbra bygging av nýggjum búeindum og harvið økja um útboðið av bústøðum.

**Avskrivingarreglur fyri langtíðarleiguíbúðir**
Avskrivingarreglurnar fyri langtíðarleiguíbúðir verða tillagaðar. Endamálið er at bøta um karmarnar um langtíðarleiguíbúðir og harvið, sum frálíður, at stuðla undir útboðið av langtíðarleiguíbúðum.

**Skatturin av sølu av fastogn verður endurskoðaður**
Ætlanin er at endurskoða skattin av sølu av fastogn. Endamálið er at tálma spekulatión við bústøðum.

**Partafelagsskatturin hjá fíggjarfyritøkum hækka til 22%**
Ætlanin er at hækka partafelagsskattin hjá fíggjarfyritøkum frá 18% til 22%. Fyrireikingarnar byrja beinanvegin. Broytingin kann í fyrsta lagi vera galdandi fyri skattaárið 2027, soleiðis at meirinntøkurnar koma í 2028. Mett verður, at tað fer at geva millum 25 og 35 mió. kr. í meirinntøkum til land og kommunur.

*Talgilding*

**Heildarætlan fyri vitlíki og vitlíkispolitikkur**
Endamálið við landsfevnandi heildarætlan fyri vitlíki er at gagnnýta vitlíki við ábyrgd og soleiðis styrkja fólkið, málið og búskapin. Heildarætlan verður liðug á heysti 2026 og skal vera grundarlag fyri heimildarlóg fyri vitlíki. Gjaldstovan stendur fyri arbeiðinum. Fyribils er tørvur á 10 mió. kr. í 2027 til at seta hol á at fremja átøk við vitlíki. Sum frálíður kann vitlíki geva størri búskaparvøkstur og flyta arbeiðsmegi yvir í øki, har tørvur er á fleiri starvsfólkum.

**Talgilding 2.0**
Íverksetanin av teimum 15 átøkunum í aðru heildarætlanini fyri at talgilda samfelagið er væl ávegis. Arbeitt verður á trimum høvuðsmótum:

1. Skipa ein talgildingarmyndugleika, ið skal standa fyri yvirskipaðu talgildingini tvørtur um allar geirar í samfelagnum.
2. Fáa samanhangandi talgildar tænastur fyri borgarar og vinnu, har talan m.a. er um at fáa fleiri heilsutænastur á Vangan og at menna ein virkisvanga, sum skal lætta um hjá vinnuni í samskiftinum við myndugleikar og borgarar.
3. Fáa munadyggari almennan geira, m.a. við at talgilda valkortið, við almennari peningastovnskontu og við at knýta persónstøl í norðurlendskum fólkayvirlitum saman.

**Kjarnan – nýggj skattaskipan í 2030**
Stóra KT-verkætlanin “Kjarnan” hjá TAKS, sum snýr seg um at endurnýggja og framtíðartryggja allar KT-skipanir hjá TAKS, hevur nú tvey ár á baki og skal ætlandi vera liðug í 2030. Arbeiðið gongur væl, og fíggjarkarmurin heldur, hóast tað tekur longri tíð enn væntað. Arbeitt verður í løtuni við at endurskoða menningarætlanina, serliga í sambandi við tíðarætlanir. Hugt verður eisini at, hvussu vitlíki í størri mun kann brúkast í menningini.

*Eftirlit*

**Skattaeftirlit**
TAKS arbeiðir áhaldandi við at skipa eftirlitsarbeiðið á skatta- og avgjaldsøkinum so skynsamt sum gjørligt við tí eftirlitsorku, sum er tøk. Tað verður gjørt við meting av økjum, har vandin fyri mistøkum er størstur, og viðurskiftum í samfelagnum annars.

Samstundis eru nógvir fyrispurningar frá grannskoðarum, løgfrøðingum og ráðgevum annars, sum skulu avgreiðast. Tískil mælir TAKS áhaldandi til møguligar lógarbroytingar, sum kunnu lætta um umsitingina og ivamál í lógum.

**Styrkja rúsevniseftirlitið við landamørkini**
Tørvur er áhaldandi á at styrkja rúsevniseftirlitið við landamørkini. TAKS hevur styrkt nakað um eftirlitið við rúsevnum seinastu árini, m.a. við effektiviseringum og umraðfestingum á stovninum, umframt at eftirlitsútgerð er keypt, og talið á tollarum er uppnormerað í 2026. Harumframt hevur TAKS í 2026 fingið atgongd til eina profileringsskipan, sum verður tikin í brúk komandi tvey árini.

TAKS hevur í 2026 eisini lagt stóran dent á at styrkja samstarvið við grannalondini um rúsevniseftirlit.

Skulu munagóð átøk verða gjørd fyri at basa rúsevnisnýtslu, er framhaldandi tørvur á fleiri tollarum, nýggjari útgerð og betri hølisviðurskiftum, eitt nú á flogvøllinum. Alt hetta eru raðfestingar, sum skulu gerast sum partur av átøkunum við at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu.

*Arbeiðsmarknaður*

**Lønarsamráðingar**
Avtala um felags lønarkarm er gjørd við 12 fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum. Semjan ásetur, hvussu lønarkarmurin verður roknaður við støði í prísvøkstri og produktivitetsvøkstri. Partarnir eru samdir um at tillaga karmin árliga við at knýta lønarvøksturin eftir hesi avtalu til

lønarkarmin á privata arbeiðsmarknaðinum. Lønarkarmurin fyrsta árið er 3,87% og er tann sami sum karmurin á privata arbeiðsmarknaðinum árið fyri.

Karmurin fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2026 til 30. september 2027 verður ásettur fyrst í oktober 2026, tá ið nýggjastu tølini eru tøk. Roknast kann við, at karmurin fer at liggja tætt at tí karmi, sum júst er avtalaður á privata arbeiðsmarknaðinum.

Avtalan um felags lønarkarm hevur sum nakað nýtt áseting um sonevnda stilling, um viðurskiftini á arbeiðsmarknaðin gera, at neyðugt er at gera broytingar í lønarbygnaðinum.

Samráðingarnar um sáttmála eru byrjaðar, bæði fyri tey fakfeløg, sum eru fevnd av avtaluni um felags lønarkarmin, og tey, sum samráðast hvørt sær. Eitt árs sáttmáli er gjørdur við fleiri fakfeløg fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2025 til 30. september 2026.

**Pensjonistar rinda arbeiðsmarknaðargjøld**
Ætlanin er, at pensjonistar skulu rinda arbeiðsmarknaðargjøld av arbeiðsinntøku, samstundis sum markið fyri mótrokning í fólkapensjónini verður hækkað.

*Kommunumál*

**Kommunurnar fáa heimild at hækka botnfrádráttin**
Kommunurnar skulu fáa heimild at hækka botnfrádráttin. Á tann hátt kann botnfrádrátturin hækka hjá kommununum við prís- og lønargongdini í samfelagnum. Fíggjarmálaráðið og Kommunufelagið fyrireika arbeiðið.

**Endurskoðaður fíggingarleistur í sambandi við eldraøkið**
Fíggingin av eldraøkinum er ein av stóru avbjóðingunum í øllum almenna búskapinum. Tí hevur tað stóran týdning fyri haldførið, at tann avbjóðingin verður loyst. Metingin frá eftirmetingini í 2021 var, at broytta fólkasamansetingin fór at tyngja raksturin hjá kommununum av eldraøkinum við 400 mió. kr. fram til 2040.

# UTTANRÍKIS- OG FISKIMÁLARÁÐIÐ

*Uttanríkismál*

Heimspolitiska støðan er fyri støðugum broytingum. Eitt tíðarskeið, sum í størri mun er merkt av, at kapping millum stórveldi tekur til. Tí er hóttanarmyndin ein onnur og álvarsamari enn fyri fáum árum síðan.

Á handilsøkinum eru viðurskiftini ógreiðari, enn tey áður hava verið – og henda støða kann fáa víðfevndar avleiðingar fyri heimshandilin.

Sum heild er tað reglubundna samstarv, sum hevur ligið til grund fyri viðurskiftunum millum lond síðan miðju 20. øld, undir stórum trýsti.

Henda støða krevur, at Føroyar reka virknan og miðvísan uttanríkispolitikk, ið hevur til endamáls at røkja føroysk áhugamál sambandi við onnur lond og millumtjóða felagsskapir. Tað fevnir bæði um at tryggja rættindi og atgongd, t.d. á fiskiveiðu- og handilsøkinum, at virka fyri nýggjum møguleikum og um at taka lut í millumtjóða samstarvi og felags átøkum, ið leggja upp fyri avbjóðingum, ið eru best lyftar av londum í felag.

Í tílíkum broytingartíðum er umráðandi at reka uttanríkispolitikk á analytiskt upplýstum grundarlagi, sum tekur støði í eini veruleikakendari heimsfatan. Tí er tað ein raðfesting hjá Uttanríkistænastuni og sendistovunum at gera greiningar og metingar, sum styrkja grundarlagið undir uttanríkispolitisku avgerðunum hjá landsstýrinum.

**Trygdarpolitikkur**
Føroyar virka fyri, at trygd og støðufesti skulu valda, og at føroyskir myndugleikar skulu hava virknan leiklut at røkka hesum máli við støði í millumtjóða samstarvi og altjóða lóg. Neyðugt er at leggja upp fyri, at við hybridum hóttanum er áður so greiða markið millum frið og stríð kámari. Samstundis er greitt, at trygdarpolitiska hugtakið alsamt víðkast og fevnir um málsøki sum orku, talgilding, fjarskifti, tøkni, veitingartrygd, millumtjóða handil og undirstøðukervi í víðari merking.

Hetta setir krøv til føroyskar myndugleikar, og tí er munandi meira samskifti og samskipan millum føroyskar myndugleikar, sum virka á markamótinum til trygd og verju. T.d. Uttanríkistænastuna, Vørn, Arbeiðs- og brunaeftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið.

Føroyar skulu vera við til at mynda gongdina, nú NATO og limalondini í størri mun enn áður vísa norðurleiðunum ans. Seinasta árið hevur hetta bæði fevnt um luttøku í NATO-venjingum og øðrum átøkum, samskifti á operativum stigi umframt politiska luttøku til ráðharrafundir í NATO.

Gott og tætt samskifti er við danska verjumálaráðið og danska uttanríkisráðið, umframt at regluligt samskifti eisini er við onnur grannalond um viðkomandi trygdar- og verjupolitiskar spurningar.

**Viðurskiftini við ES**
Evropa er merkt av stórum trygdarpolitiskum broytingum. Kríggið í Ukraina, óvissan um leiklutin hjá USA og kapping millum stórveldini ber í sær, at ES í alsamt størri mun leggur dent á og knýtir saman samstørv um t.d. trygd, handil, orku, ídnaðarmenning og undirstøðukervi. Seinastu tíðina er áhugin hjá ES fyri trygdarstøðuni á norðurleiðunum eisini øktur.

At styrkja samstarvið við ES er ein høvuðsraðfesting hjá landsstýrinum, bæði búskaparliga og á øðrum økjum. ES-marknaðurin er týdningarmesti einstaki marknaðurin fyri føroyskan útflutning. Neyðugt er tí áhaldandi at raðfesta arbeiðið at beina burtur avmarkingar í atgongdini til evropeiska marknaðin.

Formliga samstarvið við ES fevnir um handil, fiskivinnu, gransking og nýskapan umframt samskipan av reglum á fleiri økjum – eitt nú innan fyri heilsufrøði, upprunareglur, dátuvernd og avmarkandi tiltøk. Hetta merkir, at evropeiskt samstarv hevur munandi ávirkan á stóran part av føroyska samfelagnum. Somuleiðis er farið undir fyrireikingar til føroyskan atlimaskap í ES-útbúgvingarsamstarvinum Erasmus+, sum verður mett at hava stóran týdning fyri ungdóm og útbúgvingarstovnar í Føroyum.

Við tí endamáli at menna og víðka samstarvið undirritaðu Føroyar og ES í 2024 eitt semjuskjal, ið skal virka sum yvirskipaður karmur um samstarvið. Semjuskjalið fevnir um nýggj øki sum útbúgving, ferðavinnu, mentan, orkuskifti, talgilding og veðurlagsmál. Harumframt virkar semjuskjalið sum ein tvørgangandi leistur, ið tryggjar betri samskipan og samskifti í ES-kervinum um viðurskiftini við Føroyar.

**USA**
Samstarvið millum Føroyar og USA er í støðugari menning. Sendistovan í Washington DC fór undir sítt virksemi í 2024. Partalagsyvirlýsingin um økt samstarv frá 2021 er karmur um menningina av samstarvinum millum londini. Yvirlýsingin fevnir víða og staðfestir millum annað, at Føroyar og USA hava felags búskaparlig og strategisk áhugamál.

Umframt at USA er ein týðandi útflutningsmarknaður fyri Føroyar, so hevur tollpolitikkurin hjá amerikonsku stjórnini elvt til handilspolitiskar óvissur. Hesi viðurskifti hava beinleiðis týdning fyri føroyskar útflytarar. Tí verður fylgt við gongdini, og afturvendandi samband er við føroyskt vinnulív.

Trygdarpolitiski áhugin fyri tí øki, Føroyar eru partur av, er eyðsýndur. Hetta sæst aftur í sínámillum viðurskiftunum og í fleirliðaðum samstørvum, sum USA og Føroyar eru partar av. T.d. í NATO-høpi og í Arktiska ráðnum. At Føroyar seinnu árini hava verið virknar á trygdarpolitiska økinum, m.a. við at geva amerikonskum flotaførum atgongd til havnir, vera við í venjingum, seta í verk avmarkandi tiltøk og í størri mun luttaka í trygdarpolitiskum samstørvum millum sameind, letur eisini upp fyri víðkaðum samstarvi frameftir.

**Arktiska ráðið**
Føroyar hava saman við Grønlandi og Danmark formansskapin í Arktiska ráðnum.

Føroyar standa á odda fyri havraðfestingini í formansskránni, sum er orðað í tøttum samstarvi við Havstovuna. Í mai skipaðu Fróðskaparsetur Føroya, Havstovan og Uttanríkis- og fiskimálaráðið fyri UArctic ráðstevnuni, har meira enn 1100 gestir tóku lut.

Á arktiska økinum verður virkað við støði í arktiska politikkinum, sum løgtingið einmælt hevur samtykt. Politikkurin vísir á mál og átøk, ið Føroyar raðfesta í millumtjóða samstarvi í Arktis.

**Marknaðaratgongd**
Føroyar standa einsamallari enn kappingarneytarnir á handilsøkinum. Tað ber í sær ávísar avbjóðingar, tá ið ræður um at fáa Føroyum betri marknaðaratgongd. Neyðugt er tí áhaldandi at raðfesta arbeiðið at skapa áhuga fyri Føroyum, betra um verandi handilsavtalur, virka fyri nýggjum avtalum og gerast limur í WTO.

*Kina*
Landsstýrið og kinverska stjórnin hava umrøtt møguleikan fyri fríhandilssáttmála og eru samd um at fyrireika stig til tess at koma hesum máli nærri.

Í fjør vórðu tvær protokollir millum londini gjørdar, sum lótu upp fyri nýggjum møguleikum og smidligari mannagongdum í sambandi við útflutning til Kina. Nú verður arbeitt við at gera semjuskjal (MoU) sum ávegis stig til fríhandil.

*Brasil*
Eftir at formligu krøvini fyri útflutning til Brasil vórðu lokin í fjør, er brasilski marknaðurin latin upp sum ein nýggjur marknaður fyri Føroyar. Tí verður í heyst skipað fyri vinnuferð til Brasil fyri áhugaðar fyritøkur.

*Bretland*
Tá ið fríhandilssáttmálin millum Føroyar og Bretland varð gjørdur í 2019, vórðu tollfríu kvoturnar lækkaðar lutfalsliga samanborið við fríhandilssáttmálan við ES. Hetta hevur havt serligar avbjóðingar við sær fyri útflutningin av fiskafóðri. Í fjør hækkaði kvotan á fiskafóðri, ið kann flytast tollfrítt út til Bretland, munandi og er nú 20.000 tons.

Somuleiðis verður miðvíst arbeitt við at styrkja samstarvið við Bretland á fleiri økjum. Ítøkiliga umrøða partarnir orðingar í einum uppskoti til samstarvsskjal eftir sama leisti, sum er gjørt við m.a. USA og ES. Gongst sum ætlað, verður skjalið undirritað á ráðharrastigi seinni í ár.

*ES*
Virkað verður áhaldandi fyri at gera broytingar í fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og ES, serliga at fáa betri marknaðaratgongd fyri virkaðar vørur. Oman fyri 90% av føroyska útflutninginum til ES í dag hevur ongan toll.

Samstundis verður arbeitt við at dagføra heilsufrøðiligu avtaluna við ES, sum hevur stóran týdning fyri føroyskan fiskavøruútflutning, eins og tað er neyðugt at styrkja myndugleikasamstarvið á øðrum økjum, sum hava ávirkan á atgongdina til evropeiska marknaðin.

*Japan*
Arbeitt verður áhaldandi við at menna fortreytirnar fyri handilsviðurskiftunum millum Føroyar og Japan, m.a. við støði í semjuskjalinum frá 2022, ið virkar sum karmur fyri samstarvinum millum Føroyar og Japan.

Føroyska luttøkan á heimsframsýningini EXPO25 í Osaka í fjør hevur skapt áhuga fyri Føroyum og føroyskum vørum og tænastum í Japan.

*India*
Samskifti er við India um at styrkja samstarvið millum Føroya og India á millum annað handilsøkinum, fiskiveiðuøkinum og innan fyri aling, ferðavinnu og gransking.

*Suðurkorea*
Sum liður í at menna sambandið millum Føroyar og Suðurkorea varð í juni 2026 skipað fyri vinnuferð til Suðurkorea, ið er ein stórur og áhugaverdur marknaður fyri føroyskan útflutning. Vinnuferðin var væl eydnað við luttøku frá fleiri av størstu føroysku vinnufyritøkunum, og umboð fyri suðurkoreanskar myndugleikar hava longu fylgt upp við vitjan í Føroyum miðskeiðis í juli. Ítøkiligur áhugi er fyri øktum samstarvi, og á politiskum stigi eru londini samd um at taka stig til tess at tryggja betri marknaðaratgongd fyri føroyskar vørur.

**WTO-limaskapur**
Eftir avgerðina hjá trimum hægstarættardómarum í september í fjør um, at Føroyar í verandi stjórnarrættarligu støðu kunnu søkja um limaskap í egnum navni í heimshandilsfelagsskapinum WTO, hava Føroyar søkt um henda limaskap. Talan er um umfatandi og drúgva tilgongd, sum hevur høga raðfesting at koma á mál við.

**Avmarkandi tiltøk**
Um ársskiftið dagførdu Føroyar avmarkandi tiltøkini til eisini at fevna um persónar og eindir, sum verða mett at hava framt gerðir, ið hava til endamáls at ávirka støðufestið í evropeisku londunum. Landsstýrið metir áhaldandi um tørvin at tillaga og dagføra avmarkandi tiltøkini.

**Norðurlandamál**
Danmark og Føroyar hava felags formansskap í ráðharraráðnum í 2026, og tað hevur nógv virksemi við sær. Umleið 25 fundir á ráðharra- og embætisstigi verða hildnir í Føroyum í formansárinum. Formansskráin ber heitið Saman í skiftandi tíðum og varpar m.a. ljós á raðfestingar í sambandi við samfelagstrygd, tilbúgving og kappingarføri.

16. mars 2026 gjørdu norðurlendsku samstarvsráðharrarnir (MR SAM) av at seta eina nevnd at gera uppskot um dagføringar í Helsingforsavtaluni um at javnseta Føroyar, Grønland og Áland við hini Norðurlondini í norðurlendska samstarvinum. Eftir ætlan skal nevndin handa Norðurlandaráðnum eitt uppskot, sum skal viðgerast á ársfundi Norðurlandaráðsins í oktober í 2026.

**Mannarættindi**
Sum partur av fleiri sáttmálum, sum viðvíkja mannarættindum, luttekur landsstýrið við jøvnum millumbilum til ST-hoyringar um støðuna í Føroyum. Fyrr í ár var Universal Periodic Review (UPR) hoyring, sum tekur saman um samlaðu mannarættindastøðuna í heimsins londum. Føroyar fingu sum heild góð skotsmál undir hoyringini.

Áðrenn UPR-hoyringina varð skipað fyri almennum fundi, umframt at borgarar og felagsskapir kundu senda tilfar inn, sum varð nýtt í sambandi við hoyringina.

Í løtuni verður arbeitt við at fyrireika frágreiðingar til hoyring undir altjóða sáttmálanum um sivil og politisk rættindi, og undir barnarættindasáttmálanum. Hesar hoyringar verða væntandi í 2027.

*Fiskivinnumál*

**Fiskidagatal á landgrunninum og umsitingarætlan**
Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin áseta fiskidagatalið eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum hevur meginreglur fyri burðardygga stovnsrøkt. Upprunaliga umsitingarætlanin er frá 2019, men eftirmetingar eru seinni gjørdar, ið hava havt við sær skerjingar í dagatalinum. Hetta er serliga gjørt fyri at leggja upp fyri støðuni hjá toskastovninum. Veiðireglan í 2025 bar í sær, at fiskidagatalið í øllum bólkum í fiskidagaskipanini varð skorið 10%.

Toskurin á landgrunninum sær út til at vera betur fyri, og meira er at fáa av toski hjá øllum bólkum í fiskidagaskipanini. Stovnurin er tó framvegis mettur at vera niðan fyri fyrivarnismarkið í veiði-regluni. Sambært veiðiregluni er fiskidagatalið í øllum bólkum í skipanini tí skorið 5% í 2026.

**Fiskiskapur á Føroyabanka**
Føroyabanki var í nógv ár friðaður fyri nærum allari veiðu. Í 2022 varð varisliga latið upp aftur fyri vinnuligum fiskiskapi við tíðaravmarkaðari serskipan, har línuskip og útróðrarbátar kundu royna í avmarkað dagatal – eisini við línu. Skipanin varð nakað broytt í 2023 og 2024 og helt fram óbroytt í 2025 og 2026. Tørvur er tó á at eftirmeta skipanina og samstundis kanna alt regluverkið fyri fiskiskapin á Føroyabanka. Farið er undir hetta arbeiðið, og miðað verður ímóti at hava dagførda kunngerð til fiskiárið 2027.

**Nýggj skipan fyri bólk 5**
Tørvur er á at endurskoða skipanina fyri bólk 5 A og 5 B, tí núverandi skipan lýkur ikki longur sítt endamál.

Bólkur 5 fevnir um útróðrarbátar undir 15 tons. Í 2019 varð kravið fyri at fáa fiskiloyvi 5 A lækkað, og avleiðingin er, at munandi fleiri bátar nú lúka treytirnar fyri fiskiloyvi 5 A. Hetta hevur við sær, at dagatalið hjá teimum bátum, sum í størstan mun liva av útróðri, er minkað.

Arbeiðið við at endurskoða skipanina hevur verið í gongd í eina tíð, og ætlanin er at gera nýggja skipan fyri bólk 5 A og 5 B, sum verður sett í gildi 1. januar 2027.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

**Yvirlit yvir lógarbroytingarnar, sum nú eru samtyktar**
Løgtingið samtykti í vár hesar broytingar í sjófeingislógini:

- Gildistíðin á veiðiloyvum og veiðirættindum verður longd, so gildistíðin frá 1. januar 2027 verður 10 ár.
- Frágreiðingin um fyrisiting av sjófeingi skal bert leggjast fyri Løgtingið annaðhvørt ár.
- Reglurnar um skipan av fiskiskapi verða broyttar, so heimildin at skipa fiskiskapin verður samlað og nágreinað í lógini, umframt at heimild verður at lýsa ásettar kvotunøgdir og fiskidagar við fráboðan í staðin fyri kunngerð.
- Heimildin at sýta fremmandum skipum at taka ímóti vørum og tænastum í Føroyum verður víðkað.
- Heimildirnar at seta reglur um innviging, skráseting og goymslu av upplýsingum umframt innrætting og útbúnað umborð verða víðkaðar, so Føroyar kunnu seta í verk altjóða avtalu um eftirlit við fiskiskapi.
- Bannið móti at blaka veiðu fyri borð verður nágreinað, soleiðis at tað greitt fevnir um bæði at blaka og at seta veiðu út aftur.
- Reglurnar um undantøk frá landingarkravinum verða eisini broyttar. Undantøk frá at landa í Føroyum kunnu frameftir lýsast við fráboðan í staðin fyri kunngerð.
- Heimild verður givin til talgilda avgreiðslu og talgilda rindan fyri loyvir og aðrar avgreiðslur eftir sjófeingislógini.

**Virðisvøkstur og royndarfiskiskapur**
Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at stuðla undir nýggja tøkni, betri gagnnýtslu av rávøruni og størri virðisøking. Samstundis er málið, at størri partur av virðisøkingini fer fram í Føroyum. Partur av hesi ætlan er at seta gongd á Fiskivinnugrunnin til at stuðla undir virðisøking og menning í fiskivinnuni. Ætlandi verða Fiskivinnugrunnurin og verandi játtan til Fiskivinnuroyndir, ið stuðlar undir gransking og menning í fiskivinnuni, samskipað til eina munadygga skipan.

Fyrr í summar vórðu latnar tríggjar tilsagnir til royndarveiðu eftir reyðæti. Avgerð er tikin um, at í mesta lagi átta tilsagnir verða latnar tilsamans, og at í mesta lagi 15.000 tons verða latin til hvørja tilsøgn.

Tilsagnir um royndarveiðu eftir reyðæti og tunfiski hava áður verið latnar, uttan at tað veruliga hevur havt stórvegis royndir við sær. Áhugin í vinnuni fyri at gagnnýta reyðæti tykist tó vaksin seinastu tíðina, og tí verður væntað, at veruligar royndir nú verða gjørdar.

Seinastu árini eru eisini latnar einstakar tilsagnir at veiða mesopelagisk fiskasløg, talan er serliga um lakssild og prikkafisk. Smávegis royndir eru gjørdar, men veiðunøgdirnar higartil eru ógvuliga avmarkaðar.

Fiskiskapurin eftir brislingi og fjarðarsild, og partvíst eisini eftir jákupsskel, hevur verið skipaður sum royndarfiskiskapur. Arbeitt verður við at skipa henda fiskiskap við vanligum fiskiloyvi.

**Royndir við tvítroli**
Partar av trolaraflotanum hava víst áhuga fyri at sleppa at royndarveiða við tvítroli eftir upsa, svartkalva og toski á Íslandsrygginum. Tvítrol er vanligur reiðskapur at nýta í okkara grannalondum. Avbjóðingin er, at í Føroyum er fiskiskapurin skipaður við fiskidøgum, men grannalondini skipa sín fiskiskap við kvotum. Í eini kvotaskipan hevur tað ikki eins stóran týdning, hvør reiðskapur verður nýttur.

At veiða við tvítroli í eini fiskidagaskipan krevur, at skipanin verður stillað rætt, so fiskiorkan ikki økist. Tí er neyðugt við skipaðum kanningum av fiskiskapi undir Føroyum við tvítroli, sum verða gjørdar og eftirmettar í samstarvi við Havstovuna. Eisini skulu tillagingar gerast í umsitingini av fiskiorkuni, so lagt verður upp fyri hesum nýggja reiðskapi.

Seinastu árini eru royndarloyvi latin at royna við tvítroli. Kanningarnar, sum eru gjørdar higartil, eru eitt virðismikið íkast til at kanna lutfalsliga virðið av fiskidøgum ímillum ymsar veiðihættir. Tó eru kanningarnar, sum eru gjørdar higartil, ikki nøktandi grundarlag til at meta um, hvussu umlegging til tvítrol ávirkar fiskiorkuna og veiðievnini hjá flotanum. Tí hevur Havstovan gjørt eina kanningarætlan fyri royndir við tvítroli, og arbeitt verður við at geva royndarloyvir til tvítrol sambært hesi ætlan, so nóg gott grundarlag er fyri at loyva tvítroli undir Føroyum.

**Fiskiveiðisamráðingar**
Stórar avbjóðingar hava verið seinastu árini við samráðingunum millum strandarlondini um uppsjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel, men í 2025 gjørdu Føroyar, Bretland, Ísland og Noreg strandarlandasemju um makrel, og í 2024 gjørdu Føroyar og Noreg strandarlandasemju um norðhavssild. Semjurnar tryggja føroyskum skipum atgongd at fiska makrel í bretskum og norskum sjógvi og norðhavssild í norskum sjógvi.

Í strandarlandahøpi verður nú arbeitt fyri at fáa onnur lond at leggjast aftur at semjunum, eins og samráðingar eru um møguliga svartkjaftasemju.

Í 2025 hava Føroyar gjørt sínámillum fiskiveiðuavtalur við Bretland, Grønland, Ísland, Noreg og Russland. Harumframt hava Føroyar eisini veiðirættindi í NAFO-øki, í NEAFC-øki og í SPRFMO-øki.

Avtalan við Ísland fyri 2026 er sermerkt í so máta, at hon eftir kravi frá Íslandi bert er galdandi til 1. august 2026. Ísland vil hava broytingar í sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Ísland og legði dent á, tá ið avtalan fyri 2026 varð gjørd, at farast skuldi undir samráðingarnar beinanvegin. Samráðingar um avtalu fyri 2027, harundir um at leingja avtaluna fyri 2026 árið út, byrjaðu í januar 2026, og fýra samráðingarumfør hava verið millum londini higartil.

Síðan Bretland fór úr ES og gjørdist sjálvstøðugt strandarland, hevur ikki eydnast Føroyum og ES at koma ásamt um sínámillum fiskiveiðuavtalu. Føroyar og ES hava javnan samskifti um fiskivinnusamstarvið, og vilji tykist at vera frá báðum síðum at raðfesta samstarvið.

Í 2022 samdust Føroyar og Grønland um at fara undir at dagføra karmsáttmálan landanna millum, sum er frá 1997. Samráðingarnar eru nú komnar á mál, og nýggi karmsáttmálin varð undirritaður í juni og verður lagdur fyri Løgtingið í heyst.

Seint í 2025 samdust Føroyar og Russland um nýggja fiskiveiðuavtalu fyri 2026. Avtalan er nakað minni í vavi enn avtalan fyri 2025, tí lækkingar eru í kvotunum á báðum síðum. Fiskiveiðusamstarvið er ávirkað av heimspolitisku støðuni, heruppií eisini avmarkandi tiltøkum, sum lond í vesturheiminum hava sett í verk.

**Hvala- og grindamál**
Hvalateljingar vóru í Norðuratlantshavi á sumri í 2024, og vísindanevndin hjá NAMMCO hevur nú gjørt stovnsmeting av grindahvali. Stovnsmetingin er 320.000 hval, og føroyska grindaveiðan verður mett at vera burðardygg.

**Vørn**
Vørn hevur eftirlit við føroyskum og útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi og føroyskum fiskiskipum, sum fiska uttan fyri føroyskan sjógv. Stovnurin hevur somuleiðis eftirlit í føroyskum havnum við landingum og umskipingum.

Tjaldrið og Brimil, ið Vørn hevur til tilbúgvingar- og eftirlitsvirksemi, eru ávikavist 50 og 26 ára gomul. Aldurin setur støðugt økt krøv til viðlíkahald og umvælingar. Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa til vega nýtt skip fyri Tjaldrið, ið er gamalt og ótíðarhóskandi. Arbeitt verður við at fyrireika málið.

Stórt viðlíkahald verður gjørt á Brimli á sumri 2026. Arbeiðið tekur 10 vikur, og tær vikurnar er Tjaldrið tøkt.

Málsøkið "oljubasing á sjónum" kom undir ábyrgdina hjá Vørn 1. januar í 2025. Arbeitt verður við at dagføra mannagongdir og at fáa til vega útgerð at taka olju upp úr sjónum við.

**Veðurtænasta**
Veðurstovan stendur nú fyri øllum land- og havforsagnum fyri føroyska økið. Samstarvið við DMI umfatar nú bert atgongd til ymiskar skipanir umframt tænastur, sum knýta seg at teirra umboðan vegna Føroyar í World Meteorological Organisation (WMO). Arbeitt verður fram ímóti, at Føroyar fáa egnan atlimaskap í WMO.

**Tilbúgving**
Heimsstøðan er vorðin ótryggari, og tí hevur landsstýrið sett ferð á arbeiðið at styrkja føroysku samfelagstilbúgvingina. Føroyar skulu vera betur fyrireikaðar til bæði siðbundnar vanlukkur og tær nýggju hóttanirnar, sum kunnu raka eitt nú veitingartrygd, nettrygd og aðrar kritiskar samfelagsfunktiónir.

Arbeitt verður miðvíst við at fáa so greiða mynd sum gjørligt av teimum vandum og avbjóðingum, sum kunnu raka føroyska samfelagið. Hetta skal geva myndugleikum og samfelagnum betri grundarlag at raðfesta og fyrireika neyðug átøk. Samstundis er nýggj høvuðstilbúgvingarætlan gjørd, og arbeiðið við at styrkja føroysku kreppustýringarskipanina heldur fram.

Dentur verður lagdur á at styrkja mótstøðuførið í føroyska samfelagnum. Málið er at tryggja, at Føroyar eisini eru førar fyri at handfara álvarsligar kreppur, um landið í eitt tíðarskeið má klára seg við avmarkaðari hjálp uttanífrá. Arbeitt verður tí við at fáa greiðari mynd av veitingartrygdini á teimum mest kritisku samfelagsøkjunum, eitt nú matvøruveiting, orkuveiting, telesamskifti og heilivág.

Samstundis hyggur landsstýrið at, hvussu tilfeingið á tilbúgvingarøkinum kann gagnnýtast best møguligt. Málið er at styrkja samstarvið tvørtur um myndugleikar, stovnar, kommunur, vinnulív og sjálvboðin feløg, so at samvirkandi fyrimunir verða gagnnýttir, og at samlaða tilbúgvingin hjá Føroyum gerst sterkari og virknari.

Landsstýrið hevur eisini tikið stig til at menna føroysku kjarnorkutilbúgvingina, styrkja samstarvið við bjargingarfeløg og økja um venjingarvirksemið á tilbúgvingarøkinum. Harumframt eru føroysk tilmæli um heimatilbúgving givin út, so at borgarar eru betur fyrireikaðir til møguligar kreppu- og tilbúgvingarstøður.

Føroyar eru virknar í norðurlendskum og altjóða samstarvi um trygd, tilbúgving og veitingartrygd. Limaskapur í HAGA-samstarvinum og luttøka í arbeiðinum við Nordic Security of Supply Network eru týðandi stig á hesum øki.

## VINNUMÁLARÁÐIÐ

Vinnupolitikkurin hjá samgonguni byggir á fortreytirnar um frælsan marknað undir ábyrgd og við støðugum kørmum. Vinnan er grundarlagið undir búskapinum og vælferðarsamfelagnum, og almenni leikluturin er at seta karmarnar. Teir skulu vera so tryggir, sum til ber, men kortini smidligir, so at teir kunnu lagast til tíðina og til politiska veruleikan bæði í Føroyum og úti í heimi.

Vit kunnu ikki longur taka alheimsgerðina sum givið. Vit mugu tí gera enn meira fyri at styrkja mótstøðuførið, so at vit klára at standa móti kreppum og hava allar dyr opnar, so at vit kunnu leita til nýggjar marknaðir, um verandi marknaðir minka ella hvørva nøkur ár. Føroyska regluverkið má altíð lúka krøvini, sum keyparalondini seta, men skal samstundis vera so einfalt, sum til ber. At Føroyar eru smáar bæði í fólkatali og í vavi ger, at vit í mongum førum kunnu gera reglur og skipa eftirlit og tænastur, sum eru fult á hædd við londini kring okkum, men kortini einfaldari. Hetta eru kappingarfyrimunir hjá smátjóðum, sum vit kunnu gagnnýta nógv betur, enn vit gera í dag.

**Burðardygg ferðavinna**

Samgongan sær stórar møguleikar fyri vøkstri í ferðavinnuni, sum leggja upp fyri náttúru, lokal-samfeløgum og infrakervi, men lógin um burðardygga ferðavinnu eigur at verða endurskoðað.

Ítøkiliga ætlar landsstýrið, at burðardygdargjaldið verður tikið av, og at bøndur skulu kunna taka gjald frá ferðafólkum. Allar kommunur kunnu saman við viðkomandi áhugapørtum og í semju við bøndur gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað og fyriskipað soleiðis, at tað í minst møguligan mun ger seg inn á náttúru, djóralív, heimafólk, landbúnað, mentan og mentanararv. Farið verður burtur frá, at hesar ferðavinnuætlanirnar skulu góðkennast av umsitingini í Havn.

Tað er úti um landið, at ferðavinnumenningin skal fara fram í tann mun og við teirri ferð, sum fólk á ymsu støðunum vilja. Við hesum verður størri avgerðarrættur og størri ábyrgd løgd til lokalsamfeløgini og til teirra, sum varða av náttúruni, sum ferðafólkini vilja vitja.

**Almennar byggiverkætlanir og bygningsfyrisiting landsins**
Verandi skipan, har almennar byggiverkætlanir eru miðsavnaðar hjá Landsverki hevur ikki virkað eftir vild. Skipanin hevur í fleiri førum elvt til iva og ósemjur um ábyrgdarbýtið í almennum byggiverkætlanum. Ábyrgdarbýtið má vera greitt, og avgerð er tí tikin um, at ábyrgd av almennari bygging og viðlíkahaldi ikki longur skal liggja hjá Landsverki, men hjá tí stovni ella stjórnarráði, sum hevur játtanirnar á fíggjarlógini, so ábyrgd og játtan fylgjast.

Hetta verður framt við at ræðisrætturin við øllum skyldum, verður fluttur aftur til avvarðandi aðalráð, sum síðani skulu skipa egna bygningsfyrisiting á sínum málsøki. Arbeitt verður nú við, hvussu umskipanin skal fremjast í verki, eisini í sambandi við verkætlanir, sum eru í gongd, so at tryggjað verður, at tær halda fram ótarnaðar.

**Landbúnaður**
Landbúnaðurin er týðandi partur av okkara mentan og ein vinna, sum hevur stórar menningarmøguleikar, um karmarnir verða skipaðir væl. Ein avgerandi fortreyt fyri, at landbúnaður kann fáa uppaftur betri lønsemi, er virðingin fyri vinnuni. Virðingin fyri vinnuni sæst fyrst og fremst í greiðum vinnuligum kørmum, sum eisini seta vinnuni krøv.

Landbúnaðarlóggávan skal tí lagast soleiðis, at tað ber til at økja um lønsemið í landbúnaðinum. Tað er ein avgjørd fortreyt fyri at venda gongdini og at fáa ung at fáa áhuga fyri at gerast bóndur.

Ætlanin er at broyta løgtingslóg um Búnaðargrunn soleiðis, at stuðulin til velting og umvelting av lendi verður skipaður stuðul í krónum heldur enn sum stuðul sum prosentpartur av útreiðslunum fyri at velta. Ætlanin er somuleiðis at lætta um atgongdina at fáa fígging úr Búnaðargrunninum til íløgur, sum geva festinum varandi virðisøking.

Landbúnaðarstuðulin skal skipast sum lógarbundin játtan, so at landbúnaðarvinnan frammanundan veit, hvør framleiðslustuðulin verður. Ætlanin er harumframt at styrkja rættindi hjá festarunum.

**Útlendingaøkið**
Búskaparliga gongur væl, og stórt virksemi er í øllum vinnugeirum. Søguliga lítla arbeiðsloysið ger, at útlendsk arbeiðsmegi er vorðin týðandi og neyðugur partur av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Hetta kann geva avbjóðingar bæði fyri føroyingar og tilflytarar, og gongur skeiva leið, eru avleiðingarnar lutfalsliga størri,í einum lítlum samfelagi.

Farið er tí undir eina umfatandi tillaging av útlendingalógini. Ætlanin er m.a. at herða galdandi reglur fyri varandi uppihaldsloyvi í sambandi við krøv um uppihaldstíð, fíggjarlig krøv, levnaðarkrøv og integratiónskrøv. Somuleiðis er ætlanin at avmarka møguleikan hjá útlendingum, ið koma til Føroyar at arbeiða, at fáa varandi arbeiðsloyvi.

Treytirnar hjá útlendskum arbeiðsfólki at fáa samfylgjandi familju við til Føroyar verða herdar, og sama verða reglurnar fyri familjusameining. Vit skulu vera opin fyri heiminum, men vit skulu samstundis eisini varða okkum fyri at gera somu mistøk á útlendingaøkinum sum okkara grannalond.

**Menning og nýskapan**
Mótstøðuføri er ein førleiki til framhaldandi at menna vinnuna í truplum tíðum. Tí skulu karmarnir, sum eru gjørdir til nýskapan og menning, halda fram og styrkjast. Umstøðurnar hjá íverksetarum og smærri fyritøkum at mennast og vaksa í skulu vera kappingarførar við londini kring okkum. Hetta merkir bæði, at tað skal vera lætt at stovna virki, at krøvini til umsiting skulu vera so fá og einføld sum gjørligt, og at arbeitt verður við at styrkja fíggingarmøguleikar. Eisini skal vitanin um aðrar marknaðir og ráðgeving og hjálp til teirra, sum vilja útflyta, gerast uppaftur betri.

**Marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting**
Ongantíð hevur vitanin um føroyska landgrunnin verið størri enn í dag. Tøknin til at leita og bora eftir olju verður eisini betri og betri, og høgi oljuprísurin ger at oljuleitingin á okkara leiðum er farin at taka seg upp aftur. Ferð verður tí sett á arbeiðið at eggja útlendskum oljufeløgum at koma til Føroyar at leita eftir olju.

## ALMANNA- OG BÚSTAÐAMÁLARÁÐIÐ

**Almannapensjónir**
Fólkapensjonistar við arbeiðsinntøku skulu hava betri fíggjarligar umstøður, og tí verður skipanin við mótrokning endurskoðað. Ætlanin er at hækka frádráttarfríu inntøkuupphæddina fyri arbeiðsinntøku munandi, so at tað fer at loysa seg enn betur hjá fólkapensjonistum við lágum- og miðalhøgum inntøkum at arbeiða.

Tað hevur týdning fyri haldførið í føroyska búskapinum, at pensjónsaldurin í ávísan mun fylgir gongdini í livialdrinum frameftir. Neyðugt er at eftirmeta ásetingina um, hvussu pensjónsaldur verður útroknaður (livitíðarindeksering), tí verandi útrokningargrundarlag er ikki nóg greitt og gjøgnumskygt.

Flest allir føroyingar eru fevndir av bundnu eftirlønarsamansparingini sambært løgtingslóg um eftirløn – eisini tey, sum fáa almannaveitingar. Fyritíðarpensjón er tó undantikin kravinum um eftirlønargjald, og tí verða fyritíðarpensjonistar fíggjarliga verri fyri enn onnur, tá ið tey gerast eldri. Ætlanin er, at fyritíðarpensjonistar, sum flyta til fólkapensjón, skulu fáa eina eftirlønarviðbót aftrat vanligu fólkapensjónini. Uppskot verður klárt at leggja fyri Løgtingið beint eftir ólavsøku.

**Langtíðarætlan fyri bygging á almannaøkinum**

Fyrireikingar eru gjørdar til eina langtíðarætlan fyri bygging á almannaøkinum. Ætlanin, ið fer at byggja á tørvsmetingar og bíðilistar hjá Almannaverkinum, skal tryggja, at útbyggingin av almannaøkinum verður skipað við atliti at tørvi, góðsku og kostnaði.

Tørvurin á búplássum og tilboðum er stórur, og tí er neyðugt við góðari planlegging og greiðari raðfesting. Nýggjar verkætlanir skulu geva fólki betri og meira tíðarhóskandi umstøður og samstundis útvega fleiri búpláss, umlættingarpláss og onnur tilboð.

Í løtuni eru tvær stórar byggiverkætlanir í gongd. Onnur er sambýlið við Rygsá á Argjum til vaksin fólk við autismu, og hin er sambýlið í Miðvági til fólk við menningartarni og samansettum avbjóðingum. Báðar verkætlanir verða eftir ætlan lidnar við árslok 2027.

Samstundis er fyrireikingararbeiðið fyri seinna byggistig í Miðvági komið væl áleiðis. Talan er um nýggjar bústaðir til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum, sum í dag búgva í ótíðarhóskandi sethúsum. Gongst sum ætlað, verður verklagslóg løgd fyri Løgtingið í heyst.

Eisini verður arbeitt við at dagføra verandi bústovnar og fyrireika komandi verkætlanir. Nýggj grundøki eru útvegað í Nes kommunu og í Leirvík, og samskifti er í gongd um fleiri grundøki í Havn. Hetta gevur góðar fyritreytir fyri at halda fram við at betra um bútilboð og tænastur á almannaøkinum komandi árini.

**Tilhaldsstað til ung við samansettum trupulleikum**

Við støði í álitinum um endurskoðan av RÓWT og tænastum til ung við samansettum og umfatandi sálarligum, sosialum og rúsevnisligum trupulleikum verður arbeitt við at fyrireika eitt tilhaldsstað. Tilhaldsstaðið, ið verður tvinnað saman við verandi tænastur hjá RÓWT, er ætlað sum eitt sokallað låggáttartilboð, har ung kunnu fáa tryggleika, stuðul og hjálp í einum tvørgeiraligum samstarvi.

Tilhaldsstaðið verður skipað undir Almannaverkinum í samstarvi við Psykiatriska Depilin, rúsviðgerðarstovnarnar og Danmarks Fængsler på Færøerne. Ætlanin er at skipa samstarvið í einari samstarvsavtalu millum partarnar og harafturat at seta eina samstarvsnevnd, ið skal stuðla tvørfakliga og tvørgeiraliga samstarvið um tilboðið.

Tilhaldsstaðið, ið eftir ætlan letur upp seinni í ár, er hugsað sum liður í einari størri heild, har fyribyrging, viðgerð, bústaðarloysnir og tilboð eftir viðgerð skulu virka saman. Næsta stig er at lýsa og nágreina eitt viðgerðartilboð til ung við samansettum trupulleikum, so at hesin málbólkurin kann fáa meira samanhangandi hjálp og viðgerð.

**Vælferðartøkni**
Arbeiðið við at endurskoða løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin er so smátt farið í gongd. Avvarðandi partar og áhugafeløg verða boðin at koma við viðmerkingum til løgtingslógina, sum hon er í dag. Síðani er ætlanin at seta ein arbeiðsbólk, ið skal viðgera og fyrireika neyðugu broytingarnar. Eftir ætlan skal hetta arbeiðið vera liðugt seinni í ár, og møguligt broytingaruppskot verður væntandi lagt fyri Løgtingið á vári í 2027.

**Heildarætlan um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum 2023–2028**
Trý ár eru nú liðin, síðan landsstýrið í august 2023 fekk handað heildarætlanina um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum fyri árini 2023–2028. Heildarætlanin hevur 20 átøk, og flestu átøkini eru nú sett í verk.

Fýra av átøkunum snúgva seg um upplýsing og hava sum endamál at fyribyrgja harðskapi gjøgnum upplýsing. Hesi átøkini verða støðugt ment og sett í verk.

Annars er yvirskipaða endamálið at styrkja um hjálpina til tey, ið hava verið ella eru fyri harðskapi. Avtala er gjørd við Fróðskaparsetur Føroya og Heilsuskúla Føroya um, at harðskapsøkið verður partur av útbúgvingum, eins og tað áhaldandi verður skipað fyri skeiðum og ment tilfar at førleikamenna ymisku yrkisbólkarnar, ið hava markamót til harðskapsøkið.

Eftir er at seta eina hjálparlinju á stovn, ið er ætlað harðskapsraktum, avvarðandi at harðskapsraktum og yrkisfólki. Hjálparlinjan er eisini ætlað teimum, ið fremja harðskap, og sum vilja hava hjálp til at gevast við tí. Eftir at tilmælið um hjálparlinju varð handað landsstýrisfólkinum í apríl 2025, varð eitt starvsfólk sett at taka sær av at fyrireika hetta átakið. Seinkingar hava verið í arbeiðinum, men ætlanin er, at arbeiðið kann byrja seinni í 2026.

**Javnstøðumál**
Javnstøða krevur bæði politiskan vilja og sterkar stovnar. Tí arbeiðir samgongan við at styrkja skipanirnar á økinum og savna tilfeingið, so arbeiðið kann skipast meira virkið og haldført. Málið er at geva Javnstøðunevndini og skrivstovu hennara betri fyritreytir at røkja sínar uppgávur, og at styrkja rættartrygdina á økinum.

**Bústaðamál**
Landsstýrið vil betra um bústaðamøguleikarnar í Føroyum, og komandi árið verður ferð sett á hetta arbeiðið.

Seinastu 10 árini hava fleiri ymiskar frágreiðingar greinað og eyðmerkt eina langa røð av átøkum, sum kunnu bøta um støðuna á føroyska bústaðamarknaðinum.

Yvirskipað kann skiljast millum hesi sløg av átøkum: 1) átøk, ið kunnu seta ferð á bústaðabyggingina, 2) átøk, ið kunnu fáa í umfar tómar bústaðir og bústaðir, sum í dag verða nýttir til stutttíðarleigumál, og 3) átøk, ið gera tað lættari hjá nýggjum keyparum at koma inn á eigarabústaðamarknaðin.

Landsstýrið fer komandi árini at seta inn á øllum hesum økjum.

Fyri at seta ferð á bústaðabyggingina verður kannað, um tað ber til at laga bygningskunngerðina 2017 til føroysk viðurskifti. Eisini verður hugt at málsviðgerðartíð og kostnaðum í sambandi við matrikulering og tinglýsing. Harafturat verður kannað, hvussu kommunurnar kunnu fáa størri frælsi at prísáseta grundøkir.

Fyri at eggja til langtíðarleigu heldur enn stutttíðarleigu gjøgnum eitt nú Airbnb ætlar landsstýriskvinnan at broyta galdandi reglur soleiðis, at leiguinntøkur upp til 100.000 kr. bara verða skattafríar, um bústaðurin verður leigaður út í 12 mánaðir ella longur. Samstundis ætlar landsstýriskvinnan at seta mark fyri húsaleiguhækkingum, so húsaleigan ikki kann hækka meira enn prísvøksturin, uttan so at serligar orsakir eru at hækka leiguna.

Fyri at gera tað lættari hjá nýggjum keyparum og teimum, ið skulu byggja fyri fyrstu ferð at koma inn á føroyska bústaðamarknaðin verður kannað, um tað ber til – og um tað er skynsamt – at seta á stovn ein bústaðagrunn, sum kann hjálpa til við parti av fíggingini. Ætlanin er at leggja lógaruppskot fram um hetta í vár.

Landsstýriskvinnan hevur gjørt av, at frameftir skulu Bústaðir serliga byggja til ung, lesandi og lærlingar, eldri fólk og fólk við serligum tørvi. Í løtuni verður avtala gjørd við Bústaðir um, hvussu hetta verður skipað.

Bústaðapolitikkur landsins frá 2012 verður nú endurskoðaður. Yvirskipaða málið við bústaðapolitikkinum verður, at øll skulu kunna hava eitt heim. Bústaðapolitikkurin fer at lýsa tey átøk nærri, ið Landsstýrið metir vera neyðug fyri at fremja hetta málið.

**Barsilsskipanin**

Barsilsskipanin hevur í eina fjórðingsøld tryggjað føroyskum løntakarum lønarendurgjald í sambandi við barsilsfarloyvi. Endurgjaldið er 100% av mistu lønarinntøkuni, tó við einum hámarki, sum í dag er 31.922 kr. um mánaðin.

Skipanin hevur verið ment stigvíst øll hesi árini. Samgongan hevur sett sær fyri at gera barsilsskipanina smidligari, so at foreldur sjálv kunnu leggja barsilsfarloyvið til rættis. Hetta fevnir m.a. um at leingja tíðarskeiðið, sum foreldur hava rætt til barsilsfarloyvi, til tvey ár og gera tað møguligt at fáa eitt lutfalsligt útgjald úr Barsilsskipanini hetta tíðarskeiðið. Á henda hátt verður tað møguligt hjá løntakaranum eftir avtalu við arbeiðsgevaran at byrja aftur at arbeiða parttíð í eitt tíðarskeið. Eisini er ætlanin, at tað skal bera til at goyma nakrar vikur við barsilspeningi í eitt áramál.

Ætlanin er, at foreldrini skulu fáa ein umsorganardag í part um árið, til barnið fyllir sjey ár, við útgjaldi úr Barsilsskipanini. Harafturat verður ein skattafríur barnakekkur upp á 20.000 kr. latin úr Barsilsskipanini, tá ið fólk fær eitt barn.

Foreldur eiga ikki at fara niður í løn, tá ið tey fara í barsilsfarloyvi. Tí verður farið undir at finna ein leist fyri at hækka mánaðarliga hámarkið fyri barsilspeningi úr verandi 31.922 kr. um mánaðin upp á 60.000 kr. um mánaðin.

**Arbeiðsloysisskipanin (ALS)**

ALS er týðandi partur av okkara norðurlendska arbeiðsmarknaðarmodelli, sum tryggjar løntakarum arbeiðsloysisstuðul og arbeiðsgevarum atgongd til tøka arbeiðsmegi. Í sambandi við broytingarnar, sum vórðu gjørdar í ALS-lógini í 2025, eru enn nakrar kunngerðir, sum skulu tillagast, og aðrar nýggjar skulu smíðast.

**Javnviðgerðarlóg**

Bann móti mismuni á arbeiðsmarknaðinum er ein týðandi partur av evropeiskum rætti, sum heilt grundleggjandi tryggjar, at tað eru førleikarnir, og bara førleikarnir, sum gera av, um ein persónur skal fáa boðið eitt leyst starv ella skal flytast í hægri starv. Grannalond okkara hava havt slíka lóggávu í fleiri áratíggju, og ætlanin er, at sama trygd nú skal vera á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

**Trípartasamstarv**

Samgongan vil skipa og styrkja samstarvið millum arbeiðsgevarar, fakfeløg og myndugleikar. Hetta verður gjørt í trípartasamstarvi. Tað fyrsta, sum fer at verða viðgjørt í trípartasamstarvinum, fer at snúgva seg um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Yrkisútbúgvingarskipanin skal endurskoðast, arbeiðsfjøldin skal hava atgongd til førleikamenning, og atgongdin til vaksnamannalæru skal gerast betri.

**Arbeiðsumhvørvi**
Vit skulu seta okkum eina nullhugsjón, tá ið tað snýr seg um arbeiðsvanlukkur í Føroyum – og tað skulu vit gera beinanvegin. Hetta má vera eitt felags mál fyri politisku skipanina, arbeiðsgevarar og fakfeløg, og tað krevur, at vit øll taka lógvatøk saman.

Fyri at røkka hesum máli er avgerandi, at myndugleikar, arbeiðsgevarar og starvsfólk øll gera sín part. Hjá myndugleikunum merkir tað millum annað at tryggja eitt dagført og tíðarhóskandi regluverk.

Almanna- og bústaðamálaráðið fer tí at leggja serligan dent á at gera neyðugar broytingar í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi og í fleiri kunngerðum til løgtingslógina.

Ein av hesum broytingunum er, at arbeiðsplássmetingar skulu gerast fastur partur av arbeiðinum hjá føroyskum arbeiðsgevarum. Hetta skal styrkja ein fyribyrgjandi hugburð, har vandar verða eyðmerktir og tiknir í álvara, áðrenn teir gerast til vanlukkur.

Somuleiðis verða nýggjar kunngerðir gjørdar og fleiri kunngerðir dagførdar, so regluverkið fer at samsvara við tørvin á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Millum annað kunngerðir um arbeiði við vinnutólum, um handfaring av asbesti og um børn og ung í arbeiði.

## HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ

Í komandi tingsetu verður arbeitt við fleiri málum, sum skulu styrkja heilsuverkið, fremja grøna orkuskiftið og dagføra karmarnar fyri bygging, lendisnýtslu, náttúru og umhvørvi. Arbeiðið fevnir bæði um lógaruppskot, skipanarligar broytingar og fyrireikingar til størri verkætlanir, sum røkka yvir fleiri ár.

*Størri mál í komandi tingsetu*

**Lendislóg og greiðari karmar fyri bygging, náttúru og orku**
Arbeitt verður við at orða uppskot til eina nýggja lendislóg, sum skal savna og dagføra grund-leggjandi reglur um lendisnýtslu, byggisamtyktir, náttúruvernd, orkuútbyggingar og loyvisgongdir. Málið er at gera skipanina greiðari og smidligari, samstundis sum fyrilit verður havt fyri at náttúru, umhvørvi og burðardyggari samfelagsmenning. Við uppskotinum verður skilnaður gjørdur millum landslendisskipan og kommunala lendisskipan. Lendisskipanaramboð, sum í dag eru í aðrari lóggávu, t.d. í byggilógini, náttúrufriðingarlógini og løgtingslóg um landsvegir, verða flutt til nýggju lendisumsitingarlógina.

Løgtingslógin skal geva kommununum smidligari amboð til at skipa ítøkiliga nýtslu av byggilendi í samsvari við lendisætlan. Samstundis fær landsstýrið heimild til at áseta lendisskipan fyri øki, sum hava yvirskipaðan samfelagsligan týdning, so sum landsvegir, størri samferðsluverkløg og øki til orkuframleiðslu. Har landslendisskipan er galdandi, verður landsstýrið skipanarmyndugleiki og byggimyndugleiki.

**Endurvenjing verður skipað í eina greiðari eind**

Landsstýriskvinnan fer at halda á at arbeiða við at savna og skipa endurvenjing og endurmenning betur. Endamálið er, at borgarin skal hava eina greiðari og samanhangandi tænastu, og at ábyrgdarbýtið millum heilsuverk, almannaøki og kommunur verður greiðari. Í hesum sambandi verður eisini kannað, um tørvur er á eini endurvenjingarlóg.

**Nýggjur bygningur til sjúklingahotellið í Keypmannahavn**

Arbeiðið við at fyrireika nýggjan bygning til sjúklingahotellið í Keypmannahavn heldur fram. Sjúklingahotellið er týdningarmikil partur av sjúklingagongdini hjá teimum, sum fáa viðgerð uttanlands, og tørvur er á hóskandi og tryggum karmum fyri sjúklingar og avvarðandi.

**Nýggj talgild heilsuskipan er boðin út**

Verandi talgilda heilsuskipanin skal avloysast, og arbeiðið at gera nýggja felags talgilda heilsuskipan er boðið út og verður fyrireikað í løtuni. Skipanin skal stuðla undir sjúklingatrygd, samanhangandi sjúklingagongdir og betri dátugrundarlag í heilsuverkinum.

*Heilsumál*

**Eitt sameint sjúkrahúsverk**

Arbeitt verður víðari við strategiætlanini fyri Sjúkrahúsverkið fyri tíðarskeiðið 2026–2035. Málið er eitt sameint sjúkrahúsverk við trimum sjúkrahúsum í menning, har funktiónir og uppgávur verða skipaðar eftir greiðum arbeiðsbýti.

**Greiðari profilur hjá sjúkrahúsunum**

Arbeiðið við at styrkja profilin hjá hvørjum sjúkrahúsi heldur fram. Hetta skal minka um óneyðugar dupultfunktiónir og geva betri fortreytir fyri dygd, fakligari menning og tryggari sjúklingaviðgerð.

**Viðgerðartrygd**

Arbeiðið at seta viðgerðartrygd í verk byrjar við ítøkiligum økjum, og síðani verður skipanin víðkað stigvíst. Endamálið er, at sjúklingar skulu fáa greiðari rættindi og skjótari atgongd til viðgerð, tá ið bíðitíðir gerast ov langar.

**Samanhangandi sjúklingagongdir**
Arbeitt verður við at lýsa og fyrireika lógarverk og skipanir, sum skulu styrkja samanhangin millum kommunulæknar, Heilsutrygd, Sjúkrahúsverkið og aðrar partar. Málið er, at sjúklingurin skal uppliva greiðari og tryggari gongd tvørtur um stovnar og fakøki.

**Heilsuskrá og hagtøl**
Arbeitt verður framhaldandi við heilsuskrá og betri dátugrundarlagi, so virksemi, bíðitíðir, dygd og sjúklingagongdir kunnu lýsast betur og brúkast sum grundarlag fyri stýring og raðfesting.

**Førleikamenning og autorisatión**
Saman við heilsustarvsfólki og viðkomandi pørtum verður arbeitt við eini heildarætlan fyri førleikamenning og útbúgving á heilsuøkinum. Eisini verður arbeitt við at broyta málførleikakravið til autorisatión, so føroyskt mál kann javnsetast í viðkomandi skipanum.

**Langtíðarætlan fyri heilsutænastur kring landið**
Í heyst verður farið undir arbeiðið at gera langtíðarætlan fyri, hvørjar heilsutænastur kunnu flytast nærri borgaranum. Ætlanin verður væntandi handað í 2027, og verður grundarlagið undir stigvísari menning av heilsumiðstøðum og tænastum í nærumhvørvinum.

**Beinleiðis atgongd til fysioterapi**
Arbeitt verður við at fyrireika eina skipan, har borgarar fáa lættari og skjótari atgongd til fysioterapi. Endamálið er at minka um óneyðuga málsviðgerð og tryggja rættari hjálp tíðliga í sjúkugongdini.

**Fyribyrging og heilsufremjan**
Arbeitt verður við átøkum um tubbaks- og nikotinavvenjing, kost, rørslu, sálarliga heilsu og misnýtslu. Rørsluárið 2027 verður fyrireikað í 2026, og rørslu- og heilsufremjan skal setast á víðfevnda samfelagsskrá. Fólkaheilsuráðstevnan verður í heyst, sum verður fylgd upp við eini ítrótta- og rørsluviku.

**Koppsetingar**
Arbeitt verður við at styrkja kunning og skipanir fyri barnakoppsetingar, HPV, influensu og koronu. Royndarskipan við HPV-koppseting á miðnámsskúlum verður partur av arbeiðinum í 2026–2028.

**Íleguberarakanningar**
Lógaruppskot um tilboð um íleguberarakanningar verður lagt fram. Endamálið er at bjóða kanningar samsvarandi tilmælum frá Heilsustýrinum og at tryggja, at álvarsligar arviligar sjúkur kunnu fyribyrgjast ella staðfestast tíðliga.

**Kvinnuheilsa**
Arbeitt verður framhaldandi við at styrkja upplýsing, viðgerð og gransking av kvinnusjúkum, so at vitanin um kvinnuheilsu verður betri og tilboðini miðvísari.

**Barna- og ungdómspsykiatri**
Í 2027 verður farið undir at gera eina tíggju ára psykiatriætlan. Arbeiðið skal lýsa verandi støðu, stytta bíðitíðir til útgreining og styrkja samskipanina millum heilsuverk, skúlar, almannaøki og aðrar viðkomandi partar.

**Hjálp til misnýtarar og familjur**
Arbeitt verður við at styrkja fyribyrging, skjóta hjálp og viðgerð til persónar við misnýtslu og teirra familjur. Serligur dentur verður lagdur á ung, familjur og fólk við samansettum trupulleikum. Verandi skipan á rúsevnaøkinum kann styrkjast.

**Yvirtøka av málsøkinum rúsandi evni**
Arbeitt verður við at yvirtaka málsøkið rúsandi evni. Endamálið er at styrkja myndugleikaarbeiðið og gera eftirlitið við rúsevnum og rúsandi evnum greiðari og munadyggari. Ætlanin er at leggja málið fyri tingið í heyst, so yvirtøkan verður framd pr. 1. januar 2027.

**Talgildar viðtalur og vælferðartøkni**
Videoloysn til kommunulæknar og heilsumiðstøðir verður boðin út, og arbeitt verður víðari við talgildum arbeiðsháttum, sum kunnu gera tænastur lættari atkomuligar. Hetta fevnir eisini um møguleikar fyri at nýta vitlíki og onnur tøknilig frambrot.

**Landsapotekaraembætið**
Lógaruppskot um at avtaka landsapotekaraembætið verður lagt fyri Løgtingið í heyst. Uppgávurnar hjá landsapotekaranum verða eftir broytingina skipaðar millum Heilsustýrið og Apoteksverkið. Í dag er tað eitt bygnaðarligt áhugamálsstríð, av tí at tað í roynd og veru er ein og sami myndugleiki, sum øðrumegin umsitur lógirnar um apoteksverkið og heilivág og hinumegin hevur eftirlit við, at lógirnar verða hildnar.

*Orku- og umhvørvismál*

**Bygningskunngerð og byggireglugerð**
Bygningskunngerðin BK17 og byggireglugerðin FBR17 verða endurskoðaðar og dagførdar. Arbeiðið skal gera reglurnar greiðari, einfaldari og betur lagaðar til føroysk viðurskifti, eitt nú viðvíkjandi veðri, byggiháttum og kommunalum gjøldum.

**Matrikulering og talgilding**
Arbeitt verður við at stytta málsviðgerðartíðirnar á matrikkuløkinum. Í heyst verður farið undir at fyrireika arbeiðið, og í 2027 er ætlanin at gera forkanning og leggja ætlan fyri talgildari matrikkulskipan. Samstundis verða mannagongdir endurskoðaðar, og kannað verður, um partar av uppgávunum kunnu skipast øðrvísi.

**Byggisamtyktir og kommunal ábyrgd**
Arbeitt verður við at gera lógaruppskot, har kommunurnar fáa greiðari ábyrgd av byggisamtyktum, og landsmyndugleikin fær greiðan leiklut sum kærumyndugleiki og sum myndugleiki fyri yvirskipaðar karmar. Endamálið er at einfalda góðkenningargongdirnar og gera skipanina meira nútímans.

**Dagføring av orku- og veðurlagspolitikkinum**
Orku- og veðurlagspolitikkurin verður dagførdur, so at kósin fyri grøna orkuskiftið verður greiðari og ítøkiligari. Arbeiðið skal seta mál fyri framleiðslu, nýtslu, prísir, veitingartrygd og útlátsminking.

**Vindorka, sólorka og sjálvbjargni**
Ferð skal aftur setast á útbyggingina av vindorku, sólorku og aðrari varandi orku. Arbeitt verður við fleiri vindmátingum, títtari almennum útboðum og smærri orkuframleiðslum, so elframleiðslan kann fylgja økta eftirspurninginum.

**Orkunet, SEV og fleiri framleiðarar**
Arbeitt verður við at binda útbyggingarætlanina fyri elframleiðslu betur saman við netútbyggingum. Samstundis verður kannað, hvussu fleiri aktørar kunnu sleppa inn á marknaðin.

**Prísskipanir og gjøgnumskygni**
Arbeitt verður við fleksiblum og skiftandi prísskipanum, sum eggja til skynsama orkunýtslu og flyta nýtslu til tíðir, tá ið nógv grøn orka er tøk. Endamálið er bæði at minka spill og gera grøna orku meira lokkandi hjá brúkarum.

**Húski við lágum inntøkum**
Arbeitt verður við at tryggja, at húski við lágum inntøkum eisini kunnu vera við í orkuskiftinum. Møgulig átøk kunnu fevna um stuðul ella afturbering, sum lættir um íløguna í grønar orkuloysnir.

**Alternativar orkukeldur**
Í 2027 verður kannað, hvørjar fortreytir eru fyri alternativum orkukeldum, eitt nú kjarnorku. Arbeiðið skal lýsa kostnað, trygd, tørv, tøkniligar fortreytir og royndir úr øðrum londum.

**Burturkast og endurnýtsla**
Nýggj skipan fyri burturkast og endurnýtslu verður sett í verk. Kunngerðin skal geva greiðari karmar fyri innsavning, flokking og handfaring av burturkasti frá húsarhaldum og vinnu og stuðla undir meira ringbúskap.

**Loyvisgongdir eftir umhvørvisárinsmetingar**
Arbeitt verður við at gera loyvisgongdirnar greiðari og skjótari, tá ið umhvørvisárinsmetingar eru gjørdar og góðkendar. Endamálið er at minka óneyðugt bureaukrati, uttan at slakað verður við náttúru- og umhvørvisfyriliti.

**Lendisskipan fyri orku á landi og sjógvi**
Ein lendisskipan fyri orkuøkið á landi og sjógvi verður fyrireikað sum partur av arbeiðinum við lendislóg og útbyggingarætlan. Hetta skal gera tað greiðari, hvar og hvussu orkuútbyggingar kunnu fara fram.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

*Barnamál*

**Barnalógin**
Arbeitt verður við at gera uppskotið til barnalóg liðugt. Lógaruppskotið byggir á tað arbeiði, sum er gjørt í Barnaverkætlanini í samstarvi við almennar og kommunalar myndugleikar umframt stovnar, fakfólk, sivilsamfelag, børn og ung.

Barnalógin skal styrkja tvørgeiraligt samstarv og leggja lunnar undir eina meira samanhangandi skipan á barna- og ungdómsøkinum, sum stuðlar trivnaði og menning hjá øllum børnum og ungum og tryggjar børnum, ungum og familjum teirra samanhangandi tænastur.

Samstundis verður arbeitt við at fyrireika íverksetingina av lóggávuni og tær bygnaðarligu og organisatorisku broytingarnar á barna- og ungdómsøkinum, sum skulu tryggja rættstundis stuðul, tørvsgrundaðar tilgongdir, samstarv og felags ábyrgd tvørtur um geirar.

**Barnaverndarøkið**
Ætlanin er at gera tillagingar á barnaverndarøkinum, harundir at endurskoða fosturforeldraskipanina, sum frameftir eisini fer at fevna um styrkt fosturforeldur. Eisini er ætlanin at endurskoða samsýningina til fosturforeldur og umlætting til teirra. Broytingarnar á barnaverndarøkinum verða gjørdar í samstarvi við kommunurnar.

**Dagstovnaøkið**
Broytingaruppskot í dagstovnalógini verður lagt fyri Løgtingið, sum ger ábyrgdarbýtið greitt millum land og kommunur, greiðari ásetingar av tilboðum og aldursbólkum umframt skipan av námsfrøðiligari og sernámsfrøðiligari ráðgeving. Endurskoðan av dagstovnaøkinum í síni heild verður síðani sett á skrá, vísandi til, at talan er um lutfalsliga gamla lóg, sum ikki heilt sampakkar við broytingarnar, sum hava verið í føroyska samfelagnum.

*Útbúgvingarmál*

**Fólkaskúlin**
Virkað verður fyri, at vit fáa ein meira skapandi skúla, har tað kreativa, handaliga og verkliga fær størri rúmd. Hetta verður gjørt umvegis námsætlanir og raðfestingar í tímabýtium. Harnæst skal flokslæraraleikluturin og tvílæraraskipanin styrkjast, og skúlabygnaðurin verður viðgjørdur í síni heild.

Setast skal inn fyri at banna ella avmarka snildtelefonir í skúlunum og áseta aldursmark á sosialar miðlar. Møguleikarnir skulu lýsast fyrst. Landsroyndirnar í 4. og 6. flokki skulu endurskoðast og møguliga avtakast.

**Serøkið**
Sernám er lagt undir Undirvísingarstýrið fyri at styrkja sambandið við virksemið, sum er nærri næminginum. Arbeitt verður við at seta í verk tilmælir úr álitinum um sernámsfrøðiliga økið, sum varð handað í november 2025. Eftirkannað verður, hvørji tiltøk kunnu setast í verk, og hvar neyðugt er við lógarbroytingum. Orðblindaøkið skal greinast, so at neyðug átøk kunnu fremjast.

**Miðnámsøkið**
Upptøkukrøvini frá fólkaskúla til miðnám skulu endurskoðast við støðu í greiningum, sum eru gjørdar av hesum. Tveir flokkar við næmingum við autismuavbjóðingum verða tiknir inn á Glasi í august 2026.

**Yrkisútbúgvingarøkið**
Farið verður undir at greina yrkisútbúgvingarøkið, og arbeiðast skal fram ímóti, at eisini ung við serstøkum tørvi fáa møguleika fyri at taka eina yrkisrættaða útbúgving. Tá ið greiningin er fingin til vegar, verða neyðugar lógarbroytingar fyrireikaðar, og tað verður gjørt í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

**Háskúlalógin**
Háskúlalógin skal endurskoðast serliga við atliti at stuðulsskipanini. Umframt at hyggja eftir stuðulsskipanini eigur ein samlað greining av skúlatilboðum millum 9. flokk og miðnám/yrkisnám at verða gjørd. Hetta hevur m.a. við sær, at hyggjast skal eftir bæði 10. flokki, eftirskúlum, háskúlum og húsarhaldskúlum undir einum. Seinastu 10 árini hevur stórt fokus verið á hesum skúlaárinum, fleiri nýggj skúlatilboð eru skipað, og íløgur eru gjørdar í karmarnar.

**Fróðskaparsetrið**
Arbeitt verður við at fáa størri smidleika í føroyska útbúgvingarverkið við at betra møguleikan at skipa útbúgvingarleiðir, ið stuðla undir lívlanga læra o.tíl., og at fyriskipa eftirútbúgvingar og styttri útbúgvingar á bachelorstigi, sum geva førleika at virka á einum starvsøki. Arbeiðið hevur við sær broytingar í seturslóggávuni. Virkað verður fyri, at Setrið kann bjóða fleiri møguleikar við fjarlestri.

**Kampusverkætlanin**
Kampusverkætlanin heldur fram, og verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið um felagsbygningin, sum hevur verið í almennum útboði. Væntandi byrjar byggingin í heyst og fer at taka umleið trý ár. Prosjekteringin av umvælingini/umbyggingini av Frælsinum heldur fram, og verklagslóg fyri 1. byggistig verður lagt fram, tá ið útboð hevur verið. Tað eru trý byggistig í umvælingini/umbyggingini á Frælsinum, sum fer at taka í alt umleið 10 ár at fremja.

**Lestrarstuðul**
Lógarbroyting í lestrarstuðulslógini verður løgd fyri Løgtingið, har markið fyri mótrokning í lestrarstuðli í sambandi við lønarinntøku, verður hækkað.

**Vitlíki**
Stórir møguleikar eru í talgilding og vitlíki, men tað hevur eisini nógvar avbjóðingar við sær. Námsætlanir skulu broytast, og próvtøkuhættir skulu leggjast um til nýggja veruleikan við vitlíki.

*Granskingarmál*

**Gransking**
Fyrireikað verður, at Føroyar verða partur í nýggju skránni fyri granskingarsamstarv í ES, kallað FP10, sum avloysir Horizon Europe granskingarskránna. Farið verður undir fyrireikingar at skipa granskingargrunn, har vinnan kann fáa skattafrádrátt við at seta pening í grunnin. Granskingarráðið skal umsita grunnin.

**Erasmus+**
Fyrireikingar av føroyskari luttøku í Erasmus+ frá 2027 halda fram, og samráðingar verða við ES um hetta. Í hesum sambandi skal ein umsitingareind í Føroyum verða liðugt fyrireikað framman-undan, sum ES kann góðkenna. Góðkenningar av útlendskum útbúgvingum verða greinaðar í samstarvi við danskar myndugleikar.

*Mentamál*

**Listin**
Listin skal stuðlast, men hon skal ikki stýrast, og stuðulin til list skal raðfestast hægri. Harumframt verður arbeitt við at leggja stuðulin til yrkisleiklist, stuðulin til mentanarlig tiltøk og til myndlista-fólk til Mentanargrunn Landsins at umsita í samsvari við armslongdarregluna.

**Føroyska málið**
Føroyska málið skal styrkjast á øllum økjum, tað veri seg í filmi, palllist, bókmentum ella øðrum. Eitt nú er ætlanin at hækka játtanina til føroyskt framleitt tilfar til børn og ung, Móðurmálsorða-bókina, Málráðið og til at menna føroyskt barnatilfar. Eisini eigur føroyskt teknmál at verða styrkt, eitt nú við fleiri tekstingum og teknmálstulkingum av tíðindum og sendingum við stórum samfelagsligum týdningi.

Reglur fyri løggilding og stavsetingarreglur skulu gerast. Tað krevur, at lógin um Málráð verður broytt, so at heimild verður fyri einari kunngerð, ið ásetir neyvari reglur um mannagongdir, løggilding og stavsetingarreglur. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við Málráðið.

**Miðlastuðulin**
Skipanin við miðlastuðli verður endurskoðað og lógarbroyting verður løgd fyri Løgtingið.

**Lóg um onnur trúarsamfeløg**
Ein lóg um onnur trúarsamfeløg verður fyrireikað, ið staðfestir, at føroysk lóggáva, mentan, fólkaræði, javnstøða og virði skulu verða vird. Greiningararbeiðið skal gerast saman við viðkom-andi stjórnarráðum, tí tað fer at knýta seg rættarvirknaður í sambandi við aðra lóggávu, eitt nú skatta- og útlendingalóggávu.

**Føroyski báturin**
Føroyski báturin er fremsta siðbundna listaverk okkara. Føroyskt bátasmíð er framvegis livandi siðaarvur, men fáir bátar verða smíðaðir, og bátasmiðirnir fækkast. Við innskriving á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini hava vit bundið okkum til at tryggja, at føroyski

báturin, bátasmíð, siðir og brúk verða borin víðari til komandi ættarlið. Farið verður undir arbeiðið at skipa eina bátasmiðju á Tjóðsavninum, menna útbúgving í bátasmíði og at samstarva við kommunur um at skipa góðar umstøður at hava føroyskan bát.

**Vernd av jarðfestum fornlutum styrkt**
Seinastu árini hava tøknilig frambrot havt við sær, at metaldetektorar, ið kunnu brúkast til at finna metallutir í jørðini, eru vorðnir vanligir og verða brúktir til at leita eftir jarðfestum fornlutum. Verða fornlutir tiknir úr jørðini og harvið úr sínum fornfrøðiliga samanhangi á óskipaðan hátt, fer týðandi vitan um fornminnini fyri skeytið. Ætlanin er at dagføra fornminnislógina við ásetingum um, at tað ikki er loyvt at leita og grava eftir jarðfestum fornminnum uttan við loyvi frá Tjóðsavninum.

**Talgild skjalasavnindi**
Fyri at skipa viðurskiftini kring at avhenda talgild skjøl frá almennum myndugleikum til Tjóð-skjalasavnið verður arbeitt við at lýsa kunngerð um at avhenda talgildar skjalasavnsútgávur.

**Listasavn Føroya**
Komandi tvey árini verður Listasavn Føroya umvælt, umbygt og útbygt. Byggiverkætlanin er mett at kosta 70 mió. kr., harav landið fíggjar góðan triðing. Hóast farið er undir byggiverkætlanina, er Listasavnið framvegis opið fyri vitjandi.

**Kirkjubygningar**
Uppskot um broyting í lóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar verður lagt fyri Løgtingið fyri at geva møguleikar fyri fígging til bygging o.tíl. úr Tiltaksgrunninum.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Løglisti 2026

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.**
Ymiskar dagføringar. Skotið verður upp at lata pensjónsaldurin hjá landsstýrisfólkum fylgja vanliga pensjónsaldrinum annars í Føroyum, at samskipa reglurnar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. við reglurnar í løgtingslóg um samsýning og eftirløn til løgtingsfólk, og at broyta heiti á landsstýrisfólkum samsvarandi tí, stýrisskipanarlógin nú ásetur. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli (Heimild til kommunur at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli)**
Undanfarna løgting heitti á landsstýrið um at leggja fram lógaruppskot at loyva kommununum at seta upp vakmyndatól á serliga útsettum støðum í býarlívinum. Neyðugt er at fáa hesa heimild til vega við at broyta løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í retsplejelov for Færøerne**
Endamálið við uppskotinum er at dagføra føroysku rættargangslógina við teimum broytingum, sum eru framdar í donsku rættargangslógini í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2023 til 30. juni 2025. Broytingarnar umfata m.a. nýtslu av málsviðgerðarskipanini hjá dómstólunum, betri verju til órættað í málum um siðamisbrot, einfaldari mannagongd viðvíkjandi ávísum endurgjaldskrøvum, uppafturtøku av revsimálum fyri at laga seg eftir úrskurði frá Evropeiska Mannarættinda-dómstólinum (EMD) og reglur viðvíkjandi advokatum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av rúsandi evni)**
Landsstýrið ætlar at yvirtaka málsøkið “rúsandi evni”. Talan er um lóggávu innan fyri málsøkið hjá landsstýriskvinnuni í heilsumálum, og Heilsu- og orkumálaráðið fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2027**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýrismaðurin fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri Løgtingið fyri komandi álmanakkaár. Uppskotið verður lagt fyri tingið 30. september 2026.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2028–2032**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina fyri 2028. Uppskotið verður lagt fyri tingið 31. mars 2027.

**Uppskot til løguætlan fyri landið**
Arbeitt verður við langtíðarløguætlan við tí endamáli at tryggja so góða langtíðarætlan og samskipan av verkætlanunum sum møguligt. Ætlanin er at skipa breiða politiska tilgongd fyri at gera eina løguætlan, sum fevnir um 10 ár ella meira. Uppskot til samtyktar verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan og í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.**
Arbeitt verður við nøkrum fyriskipanum um fíggjarpolitiska stýring, t.d. at áseta hámark fyri útreiðsluvøkstri, játtanarkarmar fyri fleiri ár og haldførismetingar. Harumframt er ætlanin eisini at endurskoða játtanar- og roknskaparligu meginreglurnar. Tað snýr seg serliga um møguleikan fyri avskrivingum, at flyta avlop og hall fram og at leggja ætlanir fleiri ár fram. Lógaruppskot verða løgd fyri tingið á vári 2027.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um fíggjarpolitiskt haldføri.**
Búskaparráðið gav út temafrágreiðing í 2024 um fíggjarpolitisk haldføri hjá føroyska búskapinum. Frágreiðingin verður nú dagførd og løgd fram til aðalorðaskifti í Løgtinginum seinni í ár.

*Skattir, avgjøld, eftirløn o.a.*

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn**
Ætlanin er, at pensjonistar skulu rinda arbeiðsmarknaðargjøld av arbeiðsinntøku. Neyðugt er tí m.a. at dagføra lógina um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Harumframt hevur verið arbeitt við at gera broytingar í AMEG-lógini soleiðis, at farið verður aftur til skipanina við fjørutiundapørtum, har tað

er ein fyritreyt fyri at fáa fult útgjald úr grunninum, at tú hevur búð í Føroyum í minst 40 ár millum 15 ár og pensjónsaldur. Hetta er serliga við atliti at norðurlendsku sosialkonventiónini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í Løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**
Ætlanin er at hækka partafelagsskattin hjá fíggjarfyritøkum til 22%. Harumframt er ætlanin at gera stigvísa hækking í barnafrádráttinum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (mvg-endurrindan fyri bústaðarbygging)**
Við uppskotinum verður ein skipan sett í verk, so at tey, sum byggja smærri hús, raðhús, randarhús ella íbúðir, kunnu fáa endurrindað mvg av byggingini. Teir matriklar, sum fáa mvg endurrindað kunnu ikki eisini fáa rentustuðul. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning**
Avgjaldið á øl verður umskipað soleiðis, at smá bryggjarí rinda eitt lægri avgjald enn størri altjóða bryggjarí. Talan er um skipan, sum verður brúkt í ES, har smá bryggjarí, sonevnd mikrobryggjarí, kunnu fáa ein avgjaldslætta. Umskipanin fer at gera tað lættari hjá smærru bryggjaríunum at kappast við heilt stór altjóða bryggjarí. Skipanin, sum verður skotin upp, verður í samsvari við skipan í ES, sbr. ES-direktiv 1992.83, art. 4. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um tonsaskatt**
Við uppskotinum verða verandi ásetingar um time-charter (t.v.s. leigu av skipi við manning) endurskoðaðar, so at tað í størri mun verður tikin hædd fyri tíðarnýtslu í sambandi við umvæling og nýbygging av skipum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
Ætlanin er at broyta reglurnar um uttanlandsfrádrátt, samdøgursfrádrátt og frádrátt fyri arbeiðs-marknaðargjøld hjá teimum, sum arbeiða uttanlands. Skipanin verður broytt frá inntøkuárinum 2027. Tá verður uttanlandsfrádrátturin 84.000 kr., samdøgursfrádrátturin 210 kr., og latin verður ein frádráttur fyri sosial gjøld sambært norðurlendsku sosialkonventiónini frá inntøkuárinum 2026.

Limir í fakfeløgum skulu fáa partvísan frádrátt ella endurgjald fyri limagjaldið. Skipanin verður sett í verk stigvíst frá 2027.

Ætlanin er harumframt at endurskoða skattin av sølu av fastogn. Tað verður framt við broyting í skattalógini. Endamálið er at tálma spekulatión. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.**
Avskrivingarreglurnar fyri langtíðarleiguíbúðir verða tillagaðar, so at bygningar við færri enn 10 íbúðum eisini kunnu verða avskrivaðar skattliga. Endamálið er at bøta um karmarnar um langtíðarleiguíbúðir og harvið sum frá líður stuðla undir búseting. Uppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin)**
Ætlanin er, at persónar, sum hava fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón, kunnu byrja útgjald av eftirlønarsamansparing framskundað í mun til almenna fólkapensjónsaldurin. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um at innkrevja, innheinta og rokna rentu av krøvum hjá landinum**
Í sambandi við Kjarnan, stóru KT-verkætlanina hjá TAKS, verða allar mannagongdir endurskoðaðar fyri at gera raksturin skynsamari. Ein liður í arbeiðinum er at gera galdandi reglur um at innkrevja, innheinta og at rokna rentu av krøvum hjá landinum meira eins og einfaldari. Tað kann samstundis virka fyri, at fleiri mál verða avgreidd sjálvvirkandi í nýggju skipanini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Lóg um javning av skattum og avgjøldum**
Stigvaksandi trinini í inntøkuskattinum, sum eru í krónum, fylgja ikki við lønargongdini í samfelagnum. Veruligi skatturin broytist tí hvørt ár, uttan at Løgtingið hevur tikið støðu til tað. Ætlanin er at gera uppskot til lóg, sum ásetir, hvussu skattastigin verður javnaður, so hann fylgir lønargongdini í samfelagnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

*Talgilding*

**Lóg um vitlíkisátøk 2027–2029**
Ein heildarætlan fyri vitlíki verður liðug í 2026. Uppskot til heimildarlóg um átøk fyri árini 2027 – 2029 verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2027.

## UTTANRÍKIS- OG FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026**
Endamálið við uppskotinum er at fáa heimild at tilluta bólki 5 B 750 eyka fiskidagar fyri fiskiárið 2026. Uppskotið verður lagt fyri tingið beint eftir ólavsøku.

**Uppskot til samtyktar um nýggjan karmsáttmála millum Føroyar og Grønland**
Føroyar og Grønland hava seinastu árini samráðst um at dagføra karmsáttmálan millum londini, sum er frá 1997. Sáttmálin varð undirritaður síðst í juni og verður lagdur fyri Løgtingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um sjófeingi**
Samgongan hevur sett sær fyri at gera lógarverkið einfaldari. Løgtingslógin um sjófeingi verður dagførd í stigum, og fyrsti parturin verður lagdur fyri Løgtingið í februar 2027.

**Frágreiðing til aðalorðaskiftis um fyrisiting av sjófeingi**
Frágreiðing til aðalorðaskiftis um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur í hyggju at fremja. Frágreiðingin verður latin løgtinginum í vár.

## VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum á landbúnaðarøkinum**
Uppskotið hevur til endamáls at styrkja rættindi hjá festarum, avmarka møguleikan hjá Búnaðarstovuni at taka festara av ræði og endurgjald til festara fyri mist rættindi o.a. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðavinnu**
Uppskotið hevur til endamáls at lata bøndur fáa heimild at áseta treytir og avmarkingar fyri gongd í haga og rætt til at krevja gjald fyri atgongd. Harumframt er endamálið at strika kravið um góðkenning av ferðavinnuætlanin og at strika burðardygdargjaldið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landbúnaðarstuðul**
Uppskotið hevur til endamáls at gera stuðulsskipanirnar innan fyri landbúnaðin greiðari og einfaldari. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn**
Uppskotið hevur til endamáls at broyta reglurnar um stuðul at velta. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um nettrygd**
Uppskotið hevur til endamáls at styrkja net-kreppustýringina, økja mótstøðuførið og minka um samfelagsavleiðingarnar, um álop henda. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg (verklagslóg) um at høvuðsumvæla berandi undirpartin á brúnni um Streymin**
Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at beina burtur akfør á øki, har ferðslulógin er galdandi, o.a. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólka- og farmaflutning**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at áseta prísbygnað, bústaðartreytir og gjøld, knýtt at ferðaseðlaskipanini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um djórasjúkur**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at áseta listasjúkur í kunngerð. Harumframt er endamálið at áseta, at kæra, í sambandi við serliga álvarsligar djórasjúkur, ið kunnu smitta millum djórasløg og frá djóri til fólk, ikki fær steðgandi virknað. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. og løgtingslóg um djóravælferð**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at avgreiða einføld mál við fyrisitingarligari sekt. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping**
Talan er um lógartøkniligar broytingar í sambandi við kærumøguleikar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til broyting í djóravælferðarlógini**
Uppskotið hevur til endamáls í størri mun enn frammanundan, at áseta, at lagt verður upp fyri siðbundnum føroyskum djórahaldi. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at dagføra immaterialrættin (patent, vørumerki, mynstur og design)**
Uppskotið hevur til endamáls at dagføra verandi reglur á økinum, so føroyskir rættindahavarar hava somu verju sum rættindahavarar í grannalondunum og í ES. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om betalinger**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at brúka m.a. Mobile Pay umframt lógartøkniligar dagføringar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um krøv til arbeiðsgevarar, sum seta útlendskar arbeiðstakarar**
Uppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at krevja revsiváttan, áseta krøv um málkunnleika og tryggingar umframt kravda fráboðan til Útlendingastovuna í sambandi við uppsøgn. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot um broytingar í útlendingalóggávuni**
Uppskotið hevur til endamáls at seta strangari treytir fyri uppihaldsloyvi til samfylgjandi familju hjá útlendingum við arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

## ALMANNA- OG BÚSTAÐAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (1/3) (livitíðarindeksering endurskoðast)**
Livitíðarindekseringin verður endurskoðað og tillagað, so at ásetingin verður greiðari. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (2/3) (mótrokning av pensjón)**
Sum partur av ætlanini um at broyta skipanina við mótrokning verður løgtingslóg um áseting av almannaveitingum broytt soleiðis, at frádráttarfría inntøkuupphæddin hækkar, og løgtingslóg um almannapensjónir broytt soleiðis, at mótrokningarprosentið verður tillagað. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (3/3) (eftirlønarviðbót)**
Løgtingslógin verður broytt, so at fólkapensjonistar, sum áður hava fingið fyritíðarpensjón, og tí ikki hava egna pensjónsuppsparing, fáa rætt til eina eftirlønarviðbót aftrat fólkapensjónini. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið eftir ólavsøku.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (stuðul til keyp av bili)**
Løgtingslógin verður broytt soleiðis, at stuðul kann verða veittur persónum við varandi skerdum arbeiðsføri í sambandi við keyp av bili. Ætlanin er eisini at gera skipanina meira gjøgnumskygda og lættari at umsita. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (ávaringar- og peilingarskipanir)**
Løgtingslógin skal endurskoðast, so hon í størri mun fer at stuðla undir ávaringar- og peilingarskipanir. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Frágreiðing til aðalorðaskiftis um bústaðapolitikk**
Í samsvari við ætlanirnar í samgonguskjalinum at gera munagóð átøk á bústaðarmarknaðinum verður nýggjur politikkur orðaður fyri bústaðaøkið. Í hesum sambandi verður frágreiðing við ítøkiligum bústaðapolitiskum ætlanum og átøkum løgd fram til aðalorðaskiftis. Frágreiðingin verður væntandi løgd fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi (arbeiðsplássmetingar)**
Ásetingin um arbeiðsplássmetingar í løgtingslógini skal dagførast. Sambært galdandi ásetingum kann avvarðandi myndugleiki krevja, at arbeiðsgevari ger arbeiðsplássmeting, tá ið umstøður vegna trygd og heilsu gera tað neyðugt. Ætlanin er at broyta ásetingina, so kravið verður galdandi fyri allar arbeiðsgevarar. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysisskipan, løgtingslóg um barsilsskipan og løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (fólkapensjónistar rinda arbeiðsmarknaðargjøld)**
Sum liður í ætlanini at hækka frádráttarfríu inntøkuupphæddina skulu hesar løgtingslógirnar broytast, so fólkapensjonistarnir fara at rinda arbeiðsmarknaðargjøld av arbeiðsinntøkuni. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á heysti 2026 samstundis sum lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (smidligari barsilsskipan o.a.)**
Barsilslógin verður broytt soleiðis, at allar familjur (eitt foreldur) fáa ein skattafrían barnakekk upp á kr. 20.000, tá ið tær fáa eitt barn. Harafturat skal hámarkið fyri útgjald úr barsilsskipanini hækkast, eins og skipanin skal gerast smidligari, so foreldrini í størri mun sjálv kunnu leggja til rættis. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn (bústaðagrunnur)**
Ein bústaðagrunnur verður stovnaður, ið skal styrkja møguleikarnar hjá nýggjum keyparum og teimum, ið skulu byggja fyri fyrstu ferð at koma inn á bústaðamarknaðin. Hetta verður fyrst og fremst gjørt við at gera neyðugar tillagingar í Løgtingslóg um Húsalánsgrunn, so at møguleiki verður at áseta nærri treytir fyri fígging o.ø. Harumframt skal játtan helst fáast til vega á fíggjarlógini. Miðað verður ímóti at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrra byggistig í verkætlan um at byggja tvey sambýli í Miðvági til fólk við ávikavist menningartarni og samansettum avbjóðingum, harímillum autismu, og til fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum (seinna byggistig)**
Ein ískoytispartur fyri seinna byggistig skal gerast til verklagslógina fyri sambýlini í Miðvági. Talan er um nýbygging á matr. 149n, sum verður boðin út í heildararbeiðstøku. Seinna byggistig fevnir um tvær lonir til í alt 12 fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum. Nýggja sambýlið fer at eita Sambýlið í Birtulíð. Uppskot til verklagslóg verður klárt at leggja fyri tingið, tá ið tilboðini eru komin inn, og lisitatión hevur verið, væntandi seint á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kt-skipan til barsilsskipan**
Menningin av nýggju kt-skipanini hjá barsilsskipanini hevur tikið longri tíð og er vorðin dýrari enn væntað. Tí verður løgtingslóg nr. 28 frá 1. mai 2024 um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina broytt, so at tað verður møguligt at gera verkætlanina lidna. Lógaruppskot um at broyta verklagslógina verður lagt fyri tingið á heysti í 2026.

## HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ

*Heilsumál*

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (ásetingar um kanningar av ílegusjúkum)**
Í tilmælinum um ílegukanningar, sum varð handað í mars í fjør, verður mælt til, at berarakanning fyrst og fremst verður bjóðað pørum, ið planleggja at fáa barn. Harumframt er eitt aldurskrav, sum í útgangsstøðinum er 18–45 ár. Hesi krøv víkja frá meginreglunum um ókeypis viðgerð frá Sjúkrahúsverkinum, sambært § 5 og § 6 í sjúkrahúslógini. Mett verður tí, at tørvur verður á at gera eina broyting í løgtingslógini um sjúkrahúsverkið. Uppskotið verður lagt fyri tingið eftir ólavsøku.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um almenna heilslustrygd (flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita)**
Í heilsutrygdarlógini er ásett, at TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn fyri Heilsutrygd, men tað er Heilsutrygd, sum rindar kostnaðinum av hesum. Sostatt er tað TAKS, sum skipar og umsitur innkrevjingina av heilsutrygdargjaldinum, men Heilsutrygd hevur ongan leiklut í sjálvari innkrevjingini. Endamálið við broytingini er at flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttrædelse af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsansvar inden for sundhedsvæsenet"**
Føroyska lógin skal dagførast, so hon samsvarar við galdandi praksis á økinum. Kærumøguleikin skal víðkast til eisini at fevna um kærur fyri heilsufakligt virksemi á sjálvum viðgerðarstovnunum. Hetta er ikki møguligt í dag, tí borgarin er noyddur at kæra eitt ávíst navngivið heilsustarvsfólk. Harumframt verða gjørdar møguligar aðrar dagføringar í donsku lógini, sum væntandi eisini verða tiknar við í ríkislógartilmælið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á heilsuøkinum (myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkjunum "rúsandi evni")**
Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkið rúsandi evni. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar sambært lóg um mál og málsøki myndugleika at yvirtaka løggávuvaldið og útinnandi valdið á nevnda málsøki.

Ætlanin er at tilevna lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum umframt lógaruppskot um myndugleikaflytingar í sambandi við yvirtøku av málsøkinum "rúsandi evni" við støði í álitinum um møguliga yvirtøku av uppgávunum hjá landslæknaembætinum og ávísum øðrum málsøkjum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um útvegan av nýggjari talgildari heilsuskipan**
Veitarin av verandi talgildu heilsuskipan hevur sagt avtaluna um menning og viðlíkahald upp. Neyðugt er tí at útvega nýggja skipan. Arbeiðið at útvega høvuðspartin av nýggju skipanini er boðið út, og aðrir partar verða bodnir út í næstum. Tilboðið uppá høvuðspartin væntast at verða klárt at taka støðu til móti ársenda 2026, og hinir partarnir nakað inn í 2027. Áðrenn avtalur kunnu gerast við veitarar skal verklagslóg leggjast fyri løgtingið og fígging játtast. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um apoteksverkið, løgtingslóg um heilivág, løgtingslóg um almenna heilsutrygd og løgtingslóg um innflutning, nýtslu og góðskutryggjan av medisinskari útgerð (avtaka Landsapotekaraembætið og leggja myndugleikauppgávurnar hjá landsapotekaranum til Apoteksverkið og Heilsustýrið)**
Í dag er bygnaðarligt áhugamálsstríð í sambandi við, at ein og sami myndugleiki í roynd og veru øðrumegin umsitur lógirnar um apoteksverkið og heilivág og hinumegin hevur eftirlit við, at lógirnar báðar verða hildnar. Uppskotið stuðlar undir eitt meira uttanveltað eftirlit við lógunum um apoteksverkið og heilivág, umframt at gjørt verður upp við bygnaðarliga áhugamálsstríðið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í oktober.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttrædelse af lov om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed"**
Í sambandi við at seta í verk avtaluna um høvuðsútbúgvingarstørv í Sjúkrahúsverkinum verður neyðugt at gera broyting í autorisatiónslógini, soleiðis at áseting um føroysk útbúgvingarráð verður sett inn í lógina, so avtalan um høvuðsútbúgvingarstørv kann setast í verk. Harumframt er neyðugt at gera broytingar í autorisatiónslógini viðvíkjandi heimild at áseta kvotur í málkravskunngerðini og at áseta reglur um leiðsluábyrgd í journaliseringskunngerðini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

*Orku- og umhvørvismál*

**Uppskot til løgtingslóg um lendisumsiting (Lendisumsitingarlógin)**
Endamálið við uppskotinum er at skipa eina nýggja og samanhangandi lóggávu um lendisnýtslu, lendisskipan og lendisumsiting. Løgtingslógin kemur í staðin fyri løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja bygningar o.a.**
Endamálið við uppskotinum er at gera byggilógina einfaldari og greiðari. Ásetingar, sum hava dám av planamboðum, verða strikaðar, skilnaður verður gjørdur millum bygging, sum krevur skrivligt byggiloyvi eftir umsókn, og bygging, sum ikki krevur byggiloyvi, men sum tó skal fráboðast, og bygningshugtakið verður víðkað, so lógin eisini fevnir um ítróttarskýli, áskoðarapallar, veitslu- og stevnutjøld og líknandi, sum er ætlað at hýsa ella verða nýtt av fólki í styttri tíðarskeið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í februar.

**Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
IMO-sáttmálin um upphøgging av skipum, Hong Kong sáttmálin, er komin í gildi, men enn hava Føroyar ikki tikið støðu til sáttmálan. Eitt uppskot til samtyktar verður lagt fyri tingið við tilmæli um at taka undir við sáttmálanum. Fyri at seta sáttmálan í verk, verður neyðugt at dagføra ymiska lóggávu, eitt nú lógina um havumhvørvisvernd og møguliga umhvørvisverndarlógina, tí krøv skulu setast bæði skipum og góðkendum upphøggingarstøðum. Eisini skulu Føroyar boða IMO frá, hvat vit gera fyri at implementera sáttmálan við váttanum, eftirliti, eftirmeting o.a. Uppskot til samtyktar og uppskot til løgtingslóg verða løgd fyri løgtingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum í sambandi við at flyta kærumyndugleikan til Kærustovnin**
Kærumyndugleikin í fleiri lógum á umhvørvis- og orkuøkinum skal flytast til Kærustovnin. Tí er tørvur á at gera broytingar í hesum lógum: navnalógini, havumhvørvisverndarlógini, fólkayvirlits-lógini, elveitingarlógini § 16, umhvørvisverndarlógini, løgtingslóg um tinglýsingargjøld og lov for Færøerne om vandledninger. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

## MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um samstarv og samskipan av tænastum til børn og ung (Barnalógin)**
Uppskotið hevur til endamáls at tryggja tørvsgrundað, rættstundis og samanhangandi hjálp til børn, ung og familjur. Lógin skal styrkja samstarvið tvørtur um geirar og leggja lunnar undir meira samanhangandi skipan á barna- og ungdómsøkinum, sum styrkir trivnað og menning hjá øllum børnum og ungum. Lógaruppskotið verður lagt fram á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Broytingin umfatar, at fosturforeldraskipanin verður styrkt og víðkað. Ætlanin er at endurskoða bygnað, samstarvsshátt og virksemið á barnaverndarøkinum í samráð við Kommunufelagið. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
Broytingin viðvíkur m.a. skipan av menningareind og skipan av sernámsfrøðiligum tænastum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á heysti 2026.

**Uppskot til broyting í seturslógini**
Broytingini viðvíkur størri smidleika í útbúgvingarskipanini. Uppskotið verður lagt fram á heysti 2026.

**Uppskot til broytingar í fólkaskúlalógini**
Broyting verður gjørd í lógini, sum millum annað fevnir um avtøku av landsroynd. Uppskotið verður lagt fram á heysti 2026

**Uppskot til broyting í lestrarstuðulslógini**
Broytingin verður gjørd fyri at at hækka markið fyri mótrokning í lestrarstuðli í sambandi við lønarinntøku. Uppskotið verður lagt fram á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um onnur trúarsamfeløg**
Uppskotið hevur til endamáls at løgskipa treytir fyri, tá ið trúarsamfeløg skulu góðkennast. Lógin skal eitt nú staðfesta, at føroysk lóggáva, mentan, fólkaræði, javnstøða og virði skulu verða vird. Uppskotið verður væntandi lagt fram á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um miðlastuðul**
Uppskotið fer at áseta nýggjan leist fyri miðlastuðlinum. Uppskotið verður væntandi lagt fram í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.**
Broytingin snýr seg um at flyta stuðulin til yrkisleiklist frá landsstýrisfólkinum til Mentanargrunn Landsins. Uppskotið verður væntandi lagt fram á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Málráð**
Broytingin snýr seg um at gera heimild fyri í kunngerð at áseta mannagongdir fyri løggilding og stavsetingarreglur eftir tilmæli frá Málráðnum. Uppskotið verður væntandi lagt fram á vári 2027.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at friðan av fornminnum og bygningum**
Broytingin snýr seg um at løgskipa økið, tá ið farið verður út í føroysku náttúruna við metaldetektorum at leita eftir forngripum. Uppskotið verður væntandi lagt fram á heysti 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar**
Broytingin snýr seg um møguleikar at fáa fígging til bygging o.tíl. úr Tiltaksgrunninum. Uppskotið verður væntandi lagt fram á heysti 2026.

**Uppskot til broyting í verklagslóg viðvíkjandi felagsbygninginum av Kampus**
Útboð hevur verið av felagsbygninginum og klárt er at fara undir bygging, tá ið verklagslógin er broytt. Uppskotið verður væntandi lagt fram á heysti 2026.

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

Prime Minister´s Office

**Uppskot til broyting í verklagslóg viðvíkjandi framhaldandi umvæling av Kampus**

Verklagslógin, sum umfatar 1. byggistig í heildarætlanini fyri umvælingini av Frælsinum 20, skal broytast, tá ið projekteringin er liðug, og útboð hevur verið. Uppskotið verður væntandi lagt fyri Løgtingið á vári 2027.